# Útbúgvingar á Føroyamálsdeildini

NÁMSSKIPANIR

*2018*
*2. útgáva*

# INNIHALD

Útbúgvingar á Føroyamálsdeildini ... 4
Inngangur ... 4
Útbúgvingarnar ... 4
Námsskipan fyri BA-nám í føroyskum ... 6
BA-námið ... 6
Lýsing av útbúgvingini ... 6
Upptøkukrøv ... 9
Stakgreinalestur ... 9
Undantøk í upptøkutreytum til BA-evni ... 9
Lærugreinir á fyrra parti á BA (sí s. 11-26) ... 9
Skeiðslýsingar á fyrra parti á BA ... 10
Norrønt ... 11
Ljóð- og formlæra ... 12
Setninga- og merkingarfrøði ... 13
Málsøga ... 14
Norðurlendskt mál - Danskt ... 15
Norðurlendskt mál - Svenskt ... 16
Norðurlendskt mál - Norskt ... 17
Norðurlendskt mál - Íslendskt ... 18
Bókmentasøga I ... 19
Bókmentasøga II ... 20
Bókmentagreining I ... 22
Bókmentagreining II ... 23
Bókmentafrøði ... 24
Samskifti og fjølmiðlar ... 25
Vísindaástøði ... 26
Vegleiðandi yvirlit yvir lærugreinir á fyrra parti ... 27
BA - seinni partur ... 28
Undantøk í upptøkutreytum til BA-evni ... 28
Lestrarevni ... 28
Øking av lestrarevni ... 28
Lestrarlistar til bókmentalig evni á BA: ... 28
Lestrarlistar til málslig og samansett evni á BA: ... 28
Sjálvlestur ... 29
BA-ritgerð ... 29
Innlating av BA-ritgerð og møguligar seinkingar ... 29
Námsskipan fyri MA-nám ... 30
MA-nám ... 30
Lýsing av útbúgvingini ... 30
MA í føroyskum ... 33
Upptøkukrøv ... 33
Onnur upptøkukrøv: ... 33

Stakgreinalestur....33
Undantøk í upptøkutreytum til MA-evni....33
Lestrarevni....33
Øking av lestrarevni....33
Lestrarlisti til bókmentalig evni á MA:....33
Lestrarlisti til málslig og samansett evni á MA:....34
Sjálvlestur....34
Ráðstevnuluttøka....34
MA-ritgerð....34
MA-fyrilestur....35
Aðrar MA-útbúgvingar....35
MA í føroyskum bókmentum....35
MA í føroyskum máli....35
Samansett MA....35
Høvuðsgrein....36
Hjánám....36
Upptøkukrøv....36
Lýsing av útbúgving....36
Hjánám til avriksflutning....38
Felags reglur fyri MA, BA og Hjánám....39
Allýsing av lestrarevnum....39
Dømi um lestrarevni....39
Góðskrivingar av lestri uttanlands og á øðrum deildum á Fróðskaparsetrinum....39
Lokin skeið eftir eldri námsskipanum....40
ECTS (European Credit Transfer System)....40
Innskriving....40
Próvtøkur....40
Almenn próvtøkukrøv....40
Lestrarlistar....40
Verk, tekstir og blaðsíður....40
Heimauppgávur....41
Bólka- og einstaklingsuppgávur....41
Vísindaligt rættlæti....41
Próvtøkuhættir....43
Próvtøkuhættir á fyrra parti á BA....43
Próvtøkuhættir í lestrarevnum (BA og MA)....43
Reglur um krøv til málsligan rættleika í skrivligum heimauppgávum og ritgerðum....43
Førleiki í staving og málburði....43
Próvreglur....44
Próvtøka....44
Endurpróvtøka....44
Sjúka....44
Próvtøkuhald....45
Reglur um teldunýtslu til próvtøku....46
Kærur....47
Hesar broytingar/tillagingar eru gjørdar í 2. útgávu av námsskipanini:....47

# Útbúgvingar á Føroyamálsdeildini

## Inngangur

Í hesum hefti eru námsskipanirnar fyri lesturin á Føroyamálsdeildini. Námsskipanirnar eru ásetingarnar fyri innihaldið í útbúgvingini og reglurnar fyri, hvussu útbúgvingin verður útint.

Námsskipanirnar eru grundaðar á løgtingslóg og kunngerð um Fróðskaparsetur Føroya.

Námsskipanin sigur, hvørji krøv verða sett studentinum, og hvørji rættindi og skyldur hann hevur sum studentur á Føroyamálsdeildini.

Námsskipanin er galdandi ta tíð, lesturin er ásettur at vera. Um studentur vegna longda lestrartíð kemur í ta støðu, at nýggj námsskipan kemur í gildi, áðrenn studenturin hevur staðið allar próvtøkurnar, má hann gera avtalu við fyrisitingina um, hvussu lesturin verður fullførdur.

## Útbúgvingarnar

Føroyamálsdeildin veitir BA-, MA- og ph.d.-útbúgvingar. Útbúgvingarnar leggja høvuðsdentin á føroyskt mál og bókmentir frá elstu tíð til okkara dagar og samband teirra við føroyska søgu og mentan sum heild. Mál og bókmentir verða lýst í norðurlendskum høpi, og haraftrat verður hugt at fyritreytum teirra í evropeiskari søgu, heimspeki og mentan.

Námini í føroyskum hava serstøðu sum útbúgvingar í móðurmálinum. Studentar, sum fara í holt við tær, læra vísindalig háttaløg, ástøði og søguligu bakgrundina hjá tí, sum vit longu duga og kanska halda okkum vita tað mesta um, nevniliga munnligt og skrivligt føroyskt, føroyskar bókmentir og mentan.

At lesa føroyskt til BA og MA er fulltíðarstarv, og ein treyt fyri at sleppa til próvtøku er, at studenturin regluliga møtir til undirvísing. Studentarnir fyrireika seg til tímarnar og eiga harumframt at lesa sjálvir aftur at tí, sum verður viðgjørt í undirvísingini. Undirvísingarformurin kann vera: fyrilestrar, studentaframløgur, skrivligar venjingar og uppgávur, orðaskifti í bólkum og flokki, seminar og leiðbeining. Tað er sjálvsagt, at studentarnir fylgja við í mentanarlívinum, t.d. bókaútgávum og ummælum. Somuleiðis at teir fara til leiksýningar og onnur listarlig og mentanarlig tiltøk.

Umframt fulltíðarlestur ber eisini til at lesa stakar lærugreinir, bæði á BA og MA stigi.

BA er samansett av tveimum pørtum; fyrri partur er støðisnám, sum er 1½ ár við kravdum evnum; seinni partur er 1½ ár við valfríum evnum.

Hjánám er 1 árs lestur á fyrra parti av BA-námi + ½ árs lestur á MA-stigi.

MA á Føroyamálsdeildini eru hesi fýra:

- *MA í føroyskum*, samansett av BA og 2 ára framhaldsnámi í føroyskum.
- *Samansett MA*, samansett av høvuðsgrein í føroyskum, t.e. BA + høvuðsritgerð á 30 ECTS, og hjánámi í øðrum faki. Tað er miðnámslæraraprógv.
- *MA í føroyskum máli*, samansett av BA í almennum málvísindum og 2 ára framhaldsnámi í føroyskum máli.
- *MA í føroyskum bókmentum*, samansett av BA í almennari bókmentafrøði og 2 ára framhaldsnámi í føroyskum bókmentum.

Ph.d. er 3 ára granskaraútbúgving, sum serlig kunngerð er fyri.

Undirvísingin er grundað á granskingarvirksemi hjá lærarunum, sum eru granskarar á Føroyamálsdeildini. Deildin hevur til endamáls at skipa fyri gransking og undirvísing í føroyskum máli og bókmentum fyrr og nú. Eingin annar stovnur hevur henda setning, og tí áliggur tað Føroyamálsdeildini at bjóða dygdargóðar útbúgvingar á grundstigi og framhaldsstigi.

# Námsskipan fyri BA-nám í føroyskum

## BA-námið

Bachelorútbúgvingin tekur 3 ár (180 ECTS). Hon gevur rætt til heitið baccalaureus artium, stytt BA. Byrjað verður við støðisnámi, kallað fyrri partur, sum er 1½ ára nám, ið skal geva studentunum grundkunnleika í føroyskum máli og bókmentum, umframt vísindaástøði og samskifti.
Staðið støðisnám er treyt fyri at fara undir valfría partin, sum er seinna helvtin av BA-lestrinum. Tá velja studentarnir millum lestrarevni (t.e. valfríar lærugreinir), sum geva hinum einstaka møguleika at laga námið eftir áhugamálum og framtíðarætlanum sínum. Valfríi parturin er samansettur av lestrarevnum og BA-ritgerð. Studentur, ið hevur BA-prógv í føroyskum, kann søkja um upptøku á MA-nám.

## Lýsing av útbúgvingini

**BA-nám í føroyskum máli og bókmentum**

*Bachelor of Arts in Faroese language and literature*

| | |
|---|---|
| Slag av útbúgving og áramál | Tríáranám í føroyskum – 180 ECTS |
| Útbúgvingarstovnur/-ar | Fróðskaparsetur Føroya<br>*University of the Faroe Islands* |
| Stovnur, ið góðkennir útbúgvingar | Mentamálaráðið (MMR) |
| Tíðarbil, víst verður til | Námsskipan fyri føroyskt, ið er galdandi frá september 2015 |
| Stig | BA, “1st Cycle” sambært EQF – LLL og QF – EHEA stig 6. |

| A: Endamál |
|---|
| Studenturin fær grundarlag til at skilja og arbeiða greinandi við føroyskum máli og bókmentum sum samskiftismiðli, teknskipan og mentanarbera. |

| B: Eyðkenni | |
|---|---|
| **1: Grein(ir)/evnisøki** | Námsevnið er føroyskt mál og bókmentir søguliga og ástøðiliga við atliti at høvuðstáttunum máli, bókmentum og samskifti, býtt í 90 ECTS í kravdum evnum (=støðisnám) og 90 ECTS í valdum evnum, íroknað BA-ritgerð á 20 ECTS. Kravdu skeiðini eru umleið helvt um helvt mál og bókmentir umframt vísindaástøði og samskifti (50:50). Kravdu evnini eru hesi: Norrønt, Bókmentasøga I og II, Bókmentagreining I og II, Bókmentafrøði, Vísindaástøði, Ljóð- og formlæra, Samskifti og fjølmiðlar, Málsøga, Norðurlendsk mál og Setninga- og merkingarfrøði. |
| **2: Almennur/serligur dentur** | Áherðsla verður løgd á almennan kunnleika um føroyskt mál og bókmentir frá umleið 1400 til okkara dagar umframt grundleggjandi vitan um háttaløg og ástøði og at læra at nýta mál- og bókmentafrøðilig greiningarhugtøk kritiskt. |

| | |
|---|---|
| **3: Kós** | Útbúgvingin er granskingargrundað og miðar móti miðla- og mentanarvirksemi á høgum málsligum førleikastigi. |
| **4: Serlig eyðkenni** | Tað eyðkennir útbúgvingina, at mál og bókmentir verða lýst í norðurlendskum høpi; harafturat verður hugt at fyritreytum teirra í evropeiskari søgu, heimspeki og mentan. Mælt verður til, men ikki kravt, at studentarnir nýta møguleikarnar at vera skiftisstudentar á øðrum norðurlendskum universiteti. Til ber at leggja høvuðsdent á bókmentafrøði ella málfrøði. Undirvíst verður í norðurlandamálum á norðurlendskum. |

| C: Starvsmøguleikar og framhaldsútbúgving | |
|---|---|
| **1: Starvsmøguleikar** | Prógvið gevur starvsmøguleikar í almennum stovnum, miðlum og vinnuvirkjum. BA-prógvið gevur saman við høvuðsritgerð (30 ECTS) og hjánámi í aðrari lærugrein førleika at undirvísa í føroyskum í miðnámsskúlum. |
| **2: Framhaldsútbúgving** | BA-prógv í føroyskum er upptøkukrav til MA-nám í føroyskum. Við BA-prógvi í føroyskum ber til at søkja um atgongd til MA-nám uttanlands; neyðugt er at kanna upptøkutreytir í hvørjum føri, tí universitet hava ymiskar reglur. |

| D: Útbúgvingarháttur | |
|---|---|
| **1: Arbeiðslag í sambandi við læru- og undirvísing** | Undirvísingarhættirnir eru floksundirvísing við lærara- og studentaframløgum, skrivligar uppgávur, bólkarbeiði, venjingar, feltarbeiði o.a. Meginparturin av sættu lestrarhálvu er ætlaður til at skriva BA-ritgerð við vegleiðing. |
| **2: Próvtøkuhættir** | Próvtøkurnar eru munnligar og skrivligar próvtøkur, heimauppgávur við fríum og bundnum evni, og samanseting av skrivligari ella munnligari próvtøku og heimauppgávu. |

| E: Útbúgvingarførleikar |
|---|
| **1: Almennir førleikar:** |
| • Akademiskt arbeiðslag: hugsa og arbeiða skipað og kritiskt vísindaliga við einum avmarkaðum evni: nýta frøðihugtøk, orða granskingarspurningar, savna og greina tilfar, seta fram niðurstøður og úrslit.<br>• Málsligir førleikar: skriva og tosa í hóskandi samsvari við samskiftisstøðuna t.d. óformliga, formliga, vísindaliga.<br>• Sjálvstøðugt arbeiðslag: arbeiða sjálvstøðugt við atliti at evnis- og tíðaravmarking.<br>• Førleika at nýta vitan í verki |
| **2: Fakligir førleikar** |
| • Kunna greiða frá søguliga høpinum í føroyskum skaldskapi og bókmentum<br>• Duga at lýsa og greina tekst í bókmentum, skaldskapi og fjølmiðlum<br>• Innlit í høvuðstekstsløg í munnligum og skrivligum skaldskapi<br>• Innlit í hugmynda- og listfrøðilig tíðarskeið<br>• Kenna munir millum munn- og ritmentir<br>• Skilja og nýta ástøði og háttaløg í mál- og bókmentafrøði<br>• Vitan um sínámillumávirkan millum skriftmentir og samfelagsmenning<br>• Vera før/ur fyri at nýta hóskandi hugtøk, yrkisheiti og fakligan málburð hjá frøðigreinini føroyskum<br>• Grundleggjandi vitan um føroyskt mál samtíðarliga og søguliga |

- Kenna menningina av føroyskari málgransking
- Hava kunnleika um hesi málfrøðiligu øki: málsøgu, bendingarlæru, norrønt, føroyska ljóðskipan, formlæru og setningafrøði
- Duga at leita sær tilfar fram úr ymiskum keldum (elektroniskum, munnligum og skrivligum) og at viðgera tað í samanhangi og kritiskt

## F: Fullfíggjaður listi við læruúrtøkuni frá útbúgvingini

Eftir lokna útbúgving skal studentur vera førur fyri at

- Greiða frá høvuðsháttunum í føroyskari mál- og bókmentasøgu frá umleið 1400 og bera saman við eldri norðurlendsk málstig og høvuðsættir í norðurlendskari mál- og bókmentasøgu
- Skyna á høvuðsmununum millum norðurlendsk mál
- Meta um tekstir um mál og bókmentir
- Arbeiða við málsligum dátum, greina og skipa tær
- Skriva tekstir og leggja fram munnliga um bókmentir og mál grundað á nýggjastu vitan á økinum
- Leggja fram munnliga á máli, ið hóskar í samskiftisstøðuni
- Finna fram hóskandi tilfar til undirvísing í ávísum evnum
- Nýta ástøði og háttaløg á nýggjum økjum á byrjanarstigi
- Á kritiskum grundarlagi duga at taka upp og taka lut í orðaskifti um dygd í máli, bókmentum og øðrum tekstum
- Greiða frá tí, sum eyðkennir skaldslig, munnlig og skrivlig tekstsløg, yrkistekstir og tekstir í fjølmiðlum og talgildum miðlum
- Greiða frá ymiskum bókmentaligum og málsligum stílløgum
- Greiða frá nútíðar føroyskum málførum og sosialt treytaðari málvariatión
- Greiða frá granskingarsøguni hjá føroyskum máli og bókmentum

## Upptøkukrøv

Til at verða upptikin á BA og hjánám[1] í føroyskum krevst bókligt (t.e. gymnasialt) miðnámsprógv við góðum próvtali (svarar til minst 5,8 í miðal eftir 7-talsstiganum/8 í miðal eftir 13-talsstiganum) í føroyskum.
Við umsóknini skulu vera skjalprógv fyri, at studenturin hevur kravdu fortreytirnar.
Umsøkjarar, ið søkja á øðrum grundarlagi, mugu prógva, at teir lúka samsvarandi krøv. Er ivi um førleikarnar, kann skipast fyri upptøkuroynd.

## Stakgreinalestur

Stakgreinalesandi eru studentar, sum fylgja undirvísing og fara til próvs í einstøkum lærugreinum/skeiðum, uttan at vera innskrivaðir til fullan lestur.
Stakgreinalesandi søkja um upptøku til hvørt skeið sær og skulu lúka somu krøv til upptøku sum aðrir studentar.
Stakgreinalesandi kunnu verða tikin upp, um pláss er á skeiðinum.
Gjald er fyri stakgreinalestur. Skeiðsgjaldið er fyri undirvísing, vegleiðing, próvtøku og umsiting.
Søkt verður um upptøku til stakgreinalestur við serstøkum umsóknarblaði.
Fulltíðarlesandi á Setrinum kunnu taka stakskeið á øðrum útbúgvingum á Setrinum uttan at gjalda.

## Undantøk í upptøkutreytum til BA-evni

Tað ber til at søkja um upptøku á einstøk skeið á seinna parti uttan at hava fyrra part av BA frá Føroyamálsdeildini. Til tess krevst, at umsøkjarin hevur lokið 2 ára universitetsnám/BA- ella MA-nám í hóskandi grein/greinum. Eftir at hava staðið próvtøku við skeiðslok fær studenturin útskrift úr próvbókini við úrslitinum. Studentar, ið eru innskrivaðir eftir hesi undantaksreglu, fáa ikki fult BA-prógv frá Føroyamálsdeildini við at taka eina ávísa nøgd av stigum.

## Lærugreinir á fyrra parti á BA (sí s. 11-26)

Fyrri partur er 1½ ár. Lærugreinirnar eru allar kravdar.

[1] Studentar, sum søkja inn á hjánámið, skulu hava staðið ella vera innskrivaðir til eina høvuðsgrein

# Skeiðslýsingar á fyrra parti á BA

| 1. hálva | 2. hálva | 3. hálva |
|---|---|---|
| Bókmentagreining I<br>5 ECTS | Bókmentagreining II<br>5 ECTS | Vísindaástøði<br>10 ECTS |
| Ljóð- og formlæra<br>10 ECTS | Norrønt<br>10 ECTS | Bókmentafrøði<br>5 ECTS |
| Bókmentasøga I<br>10 ECTS | Málsøga<br>8 ECTS | Setninga- og merkingarfrøði<br>8 ECTS |
| Samskifti og fjølmiðlar<br>5 ECTS | Bókmentasøga II<br>10 ECTS | |
| Norðurlendsk mál<br>2 ECTS | | Norðurlendsk mál<br>2 ECTS |

# Norrønt

**Skeiðsnummar:** 1025.15

**ECTS:** 10

**Stig:** BA

**Endamál:** At studentar fáa góðan kunnleika í norrønum máli, sum gevur førleika at skilja málsøgu, bæði føroyska og aðra norðurlendska. Við tað at føroyskt er sprottið úr norrønum, og at nútíðarføroyskt skriftmál hevur uppruna sín í teirri regluskipaðu stavseting, ið nýtt verður til norrønar tekstir, er tað grundarlag undir søguligari fatan av føroyskum.

**Innihald:** Saman við tekstalestri verður farið ígjøgnum ljóðlæruna, t.e. avljóð, umljóð, ljóðbrot, samandráttur og úrfelling, umframt hjáljóðabroytingar so sum ljóðlíking, hjáljóðastytting og hjáljóðaleinging. Farið verður ígjøgnum teir ymisku orðaflokkarnar so sum navnorð, lýsingarorð, hjáorð, talorð, sagnorð og onkrar fornavnaflokkar.

**Læru- og undirvísingarhættir:** Undirvíst verður 2 x 2 tímar í eina hálvu. Undirvísingin fer í høvuðsheitum fram sum fyrilestrar, studentaframløgur og við venjingum.

**Læruúrtøka:** Studenturin skal vera førur fyri at

- gera grein fyri ymiskum sjálvljóða- og hjáljóðabroytingum so sum umljóði, ljóðbroti, úrfelling og ljóðlíking
- gera grein fyri teimum ymisku navnorðastovnunum og benda navnorð í bundum og í óbundnum sniði
- stigbenda lýsingarorð og hjáorð
- benda persónsfornøvn og ávísingarfornøvn
- greina sagnorð í veikt bendar og sterkt bendar sagnorðaflokkar og benda sagnorð í høvuðstíðunum
- umseta norrønan tekst til føroyskt

**Próvtøkuháttur:** Skrivlig próvtøka í 5 tímar. Til próvtøkuna er loyvt at hava allar orðabøkur við.

**Endurpróvtøka**: Eins og reglulig próvtøka.

**Próvdøming:** Uttanhýsis próvdøming.

**Próvtalsstigi:** Galdandi próvtalsstigi.

**Ábyrgd:** Anfinnur Johansen

## Ljóð- og formlæra

**Skeiðsnummar:** 1235.17

**ECTS:** 10

**Stig:** BA

**Endamál:** At fáa innlit í føroyska ljóðlæru, ljóðskipan og formlæru soleiðis, at studenturin dugir føroyska ljóðskrift, kennir ljóðskipanina og kennir føroyska orðmyndan.

**Innihald:** Í ljóðlæru og ljóðskipanarlæru fær studenturin ástøðiligan og verkligan kunnleika um evnið við serligum denti á føroyskt. Í formlæru verður arbeitt við orðmyndan alment og orðmyndan í føroyskum serliga. Tað merkir, at arbeitt verður við bendingum, avleiðslum, samansetingum og ljóðbending. Ein partur av lestrinum eru heimauppgávur, sum studenturin skal lata inn ásetta tíð.

**Læru- og undirvísingarhættir:** Undirvíst verður 2 tímar um vikuna í eina lestrarhálvu. Undirvísingin fer í høvuðsheitum fram sum fyrilestrar, studentaframløgur, bólkaarbeiði, venjingar (skulu latast inn ásetta tíð) og sjálvlestur.

**Læruúrtøka:** Studentur, ið hevur staðið føroyska ljóð- og formlæru sum part av BA-prógvi í føroyskum, hevur, tá ið skeiðið er lokið, fingið kunnleika um ljóðlæru, ljóðskipanarlæru og formlæru alment. Við hesari vitan skal studenturin

- duga at nýta fakheiti innan ljóðlæru, ljóðskipanarlæru og formlæru
- duga IPA ljóðskriftina og nýta hana at ljóðskriva føroyskt talað mál
- kenna og hava skilt høvuðsreglurnar í føroyskari ljóðskipan
- duga at arbeiða við føroyskari orðmyndan (avleiðslum, samansetingum og bendingum) og hava skil á føroyskari ljóðbending.
- hava grundleggjandi innlit í málvísindalig háttaløg
- vera før/ur fyri at umrøða málsligar spurningar við hóskandi hugtøkum á málvísindaligum grundarlag.

**Prótøkuháttur:** Skrivlig próvtøka í 4 tímar, har øll hjálparamboð eru loyvd.

**Endurpróvtøka:** Eins og reglulig próvtøka.

**Próvdøming:** Innanhýsis próvdøming

**Próvtalsstigi:** Staðið/Ikki staðið

**Lestrarlisti:** Petersen, H. P. 2014. *Føroysk mállæra I. Kyn, orðmyndan og bending.* Málseta.

Ymiskar greinir, sum verða lagdar á Moodle (lestrarpallur).

Innleiðslubók til málvísindi. Talan er um handrit, sum verður útflýggjað studentunum.

**Ábyrgd:** Hjalmar P. Petersen

## Setninga- og merkingarfrøði

**Skeiðsnummar:** 1232.15

**ECTS:** 8

**Stig:** BA

**Endamál:** At studenturin fær grundliggjandi innlit í setningafrøði og merkingarfrøði sum málvísindaligar frøðigreinir. At studenturin lærir um setningafrøðiliga bygnaðin í føroyskum setningum, hvussu ymisk sløg av setningum virka saman í eini heild og mennir evnini at greina setningar setningafrøðiliga. At studenturin lærir at viðgera mál við støði í merkingarfrøðiligum hugtøkum og dugir at síggja tað í sambandi við skyldar greinir sum t.d. pragmatikk.

**Innihald:** Í setningafrøði verður høvuðsdentur lagdur á almenn setningafrøðilig hugtøk og føroyska setningafrøði og at víðka og dýpa tann ástøðiliga og verkliga kunnleikan um føroyska setningafrøði. Merkingarfrøðiliga verður dentur lagdur á viðkomandi hugtøk og hættir at meta um mál og at lýsa tey úr merkingarfrøðiligum sjónarhorni. Studenturin fær javnan venjing í at greina føroyskt setningafrøðiliga og merkingarfrøðiliga.

**Læru- og undirvísingarhættir:** Undirvíst verður 3 tímar um vikuna í eina lestrarhálvu. Undirvísingin fer í høvuðsheitum fram sum fyrilestrar, studentaframløgur og við venjingum, bólkarbeiði og sjálvlestri.

**Læruúrtøka:** Studentur, ið hevur staðið setninga- og merkingarfrøði sum part av BA-prógvi í føroyskum, hevur, tá ið skeiðið er lokið, fingið kunnleika um setningafrøði og merkingarfrøði alment og við serligum atliti at føroyskum. Við hesari vitan skal studenturin duga at

- nýta fakheiti innan setningafrøði og merkingarfrøði
- greina føroyskar setningar úr skrift og talu
- gera grein fyri ymiskum sløgum av setningum og leikluti teirra í setningsheildini
- gera grein fyri setningafrøðiligum stigskipanum
- greiða frá merkingarligum leiklutum í setningafrøðiligum høpi
- greina føroyskt merkingarfrøðiliga
- lýsa føroyskt úr merkingarfrøðiligum sjónarhorni.

**Próvtøkuháttur:** Skrivlig próvtøka í 5 tímar. Til próvtøkuna eru øll hjálparamboð loyvd.

**Endurpróvtøka**: Eins og reglulig próvtøka.

**Próvdøming:** Uttanhýsis próvdøming.

**Próvtalsstigi:** Galdandi próvtalsstigi.

**Lestrarlisti:**
Höskuldur Thráinsson et al. 2012: Faroese. An overview and reference grammar. Fróðskapur: 223-338.

Ymist tilfar og greinir, sum verða løgd á Moodle (lestrarpallur).

Kapitlar um setningafrøði, merkingarfrøði og pragmatikk í innleiðslubók til málvísindi (í handriti). Tilfarið verður útflýggjað.

**Ábyrgd:** Zakaris Svabo Hansen

## Málsøga

**Skeiðsnummar:** 1020.15

**ECTS**: 8

**Stig**: BA

**Endamál**: At studenturin ognar sær innlit í lærugreinina Málsøgu, málsøgulig hugtøk og háttaløg til at fáa greiði á høvuðsdráttunum í søguni hjá norðurlandamálunum, tó serliga hjá føroyskum máli frá umleið 1300 til nútíðina.

**Innihald**: Í Málsøgu verður arbeitt við føroyskum máli í søguligum høpi, har ið ljós verður varpað á málbroytingar og søguligu menningina hjá málinum. Tað verður lutvíst gjørt við at samanbera yngri og eldri málstig og lutvíst við at samanbera føroyskt við onnur norðurlandamál. Málsøga fevnir bæði um tekstalestur og ástøði. Lesturin er vanliga skipaður í tíðarrað frá elstu tíðum og frameftir. Dentur er lagdur á ljóð-, form- og setningafrøðiligar broytingar, eins og orðfeingið gjøgnum tíðirnar verður viðgjørt.

Tekstirnir skulu geva eina mynd av málinum eitt ávíst tíðarskeið í søguni, meðan tann ástøðiligi parturin viðger orsakir til málbroytingar og roynir at svara spurningum sum: hvat hendir, tá ið broytingar fara fram, hvussu og hví henda málbroytingar, viðgera útbreiðsluvegir o.s.fr. Tann ytra málsøgan verður eisini viðgjørd, t.e. samfelagsumstøðurnar, sum málið er ein partur av. Føroyskir navnasiðir eins og føroyska stavsetingin verða viðgjørd í søguligum høpi.

**Læru- og undirvísingarhættir**: Undirvíst verður 2 x 2 tímar um vikuna í eina lestrarhálvu. Undirvísingin fer í høvuðsheitum fram sum fyrilestrar, studentaframløgur og við bólkarbeiði.

**Læruúrtøka**: Studentur, ið hevur staðið málsøgu sum part av BA-prógvi í føroyskum, hevur, tá ið skeiðið er lokið, lutvíst fingið kunnleika um føroyska málsøgu og lutvíst grundleggjandi vitan um háttaløg og ástøði, sum verða nýtt í málsøguligum arbeiði. Við hesari vitan skal studenturin duga at

- arbeiða verkliga og ástøðiliga við málsøguligum spurningum
- samanbera tekstir frá ymsum tíðarskeiðum og gera niðurstøður um málbroytingar við støði í tekstum
- staðseta og tíðarfesta tekstir í høvuðsheitum
- miðla málsøguliga vitan munnliga og skrivliga
- umrøða málsøguligar spurningar fakliga dygt
- seta fólka- og staðanøvn inn í ein málsøguligan samanhang
- seta orðaskiftið um tann føroyska stavsetingarspurningin inn í ein størri málsligan samanhang

**Próvtøkuháttur**: Próvtøkan er býtt sundur í tveir partar. Ein skrivlig próvtøka í 3 tímar, har einastu loyvdu hjálparamboð eru orðabøkur. Sama dag verður ein bundin heimauppgáva útflýggjað, sum skal latast inn kl. 12.00 tríggjar dagar seinni. Heimauppgávan skal vera 4-6 síður til longdar. Próvtøkurnar telja eina helvt hvør. Studenturin skal hava staðið báðar partar fyri at standa.

**Endurpróvtøka**: Skrivlig próvtøka í 5 tímar. Til endurpróvtøkuna eru orðabøkur einastu loyvdu hjálparamboð.

**Próvdøming**: Uttanhýsis próvdøming. Givið verður eitt felags próvtal.

**Próvtalsstigi**: Galdandi próvtalsstigi.

**Lestrarlisti:** Lestrarlisti verður útflýggjaður við skeiðsbyrjan.

**Ábyrgd**: Jógvan í Lon Jacobsen

## Norðurlendskt mál - Danskt

**Skeiðsnummar**: 1045.16

**ECTS**: 2

**Stig**: BA

**Endamál**: Endamálið við Donskum er at seta danska málsøgu inn í ein størri norðurlendskan samanhang. Skeiðið er ætlað sum uppískoyti til frálæruna í málsøgu við tí endamáli, at studenturin ognar sær grundleggjandi vitan um menningina hjá donskum frá umleið 1300 til nútíðina.

**Innihald**: Lisið verður eitt hóskandi úrval av tekstum, sum umboða ymisk tíðarskeið, samstundis sum ymisk ástøði og háttaløg verða umrødd. Høvuðsdenturin liggur í tí málsøguliga partinum, men samtíðarlig viðurskifti, t.d. dialektir og samfelagsmálvísindi, kunnu eisini verða tikin við sum partur av frálæruni.

**Læru- og undirvísingarhættir**: Frálæran fer fram sum sjálvstøðugt intensivt skeið við gestalærara, og tí ber ikki til at áseta, nær skeiðið verður hildið. Skeiðið er 15 tímar. Undirvísingin fer í høvuðsheitum fram sum fyrilestrar, studentaframløgur og við bólkarbeiði.

**Læruúrtøka**: Studenturin skal vera førur fyri at

- greiða frá grundleggjandi málsøguligum (í minni mun dialektalum og samfelagsmálvísindaligum) fyribrigdum í donskum
- greina munir og líkleikar millum danskt og føroyskt
- umrøða viðkomandi spurningar fakliga dygt og kunna miðla sína vitan um danskt munnliga eins væl og skrivliga

**Próvtøkuháttur**: Munnlig próvtøka við hálvtíma fyrireiking verður hildin, tá ið skeiðið er liðugt. Hjálparamboð eru uppgivnir tekstir og orðabøkur. Lærarin, sum hevur havt skeiðið, ella ábyrgdarlærarin hevur studentin til próvtøku.

Um studenturin fylgir 80% av tímunum og er virkin í undirvísingini, sleppur hann/hon frá próvtøku.

**Endurprótøka:** Eins og reglulig próvtøka.

Studentur, ið tekur eitt norðurlendskt summarskeið uttanlands (Nordkurs), kann fáa tað góðskrivað fyri tey bæði norðurlendsku skeiðini á deildini, um hann/hon vil tað.

**Próvdøming**: Innanhýsis próvdøming.

**Próvtalsstigi**: Staðið/ikki staðið.

**Lestrarlisti**: Til próvtøkuna gevur studenturin upp tað tilfar, sum lisið er á skeiðinum, ella 50 síður.

**Ábyrgd**: Zakaris S. Hansen

## Norðurlendskt mál - Svenskt

**Skeiðsnummar**: 1046.16

**ECTS**: 2

**Stig**: BA

**Endamál**: Endamálið við Svenskum er at seta svenska málsøgu inn í ein størri norðurlendskan samanhang. Skeiðið er ætlað sum uppískoyti til frálæruna í málsøgu við tí endamáli, at studenturin ognar sær grundleggjandi vitan um menningina hjá svenskum frá umleið 1300 til nútíðina.

**Innihald**: Lisið verður eitt hóskandi úrval av tekstum, sum umboða ymisk tíðarskeið, samstundis sum ymisk ástøði og háttaløg verða umrødd. Høvuðsdenturin liggur í tí málsøguliga partinum, men samtíðarlig viðurskifti, t.d. dialektir og samfelagsmálvísindi, kunnu eisini verða tikin við sum partur av frálæruni.

**Læru- og undirvísingarhættir**: Frálæran fer fram sum sjálvstøðugt intensivt skeið við gestalærara, og tí ber ikki til at áseta, nær skeiðið verður hildið. Skeiðið er 15 tímar. Undirvísingin fer í høvuðsheitum fram sum fyrilestrar, studentaframløgur og við bólkarbeiði.

**Læruúrtøka**: Studenturin skal vera førur fyri at

- greiða frá grundleggjandi málsøguligum (í minni mun dialektalum og samfelagsmálvísindaligum) fyribrigdum í svenskum
- greina munir og líkleikar millum svenskt og føroyskt
- umrøða viðkomandi spurningar fakliga dygt og kunna miðla sína vitan um svenskt munnliga eins væl og skrivliga

**Próvtøkuháttur**: Munnlig próvtøka við hálvtíma fyrireiking verður hildin, tá ið skeiðið er liðugt. Hjálparamboð eru uppgivnir tekstir og orðabøkur. Lærarin, sum hevur havt skeiðið, ella ábyrgdarlærarin hevur studentin til próvtøku.

Um studenturin fylgir 80% av tímunum og er virkin í undirvísingini, sleppur hann/hon frá próvtøku.

**Endurpróvtøka:** Eins og reglulig próvtøka

Studentur, ið tekur eitt norðurlendskt summarskeið uttanlands (Nordkurs), kann fáa tað góðskrivað fyri tey bæði norðurlendsku skeiðini á deildini, um hann/hon vil tað.

**Próvdøming**: Innanhýsis próvdøming.

**Próvtalsstigi**: Staðið/ikki staðið.

**Lestrarlisti**: Til próvtøkuna gevur studenturin upp tað tilfar, sum lisið er á skeiðinum, ella 50 síður.

**Ábyrgd**: Zakaris S. Hansen

## Norðurlendskt mál - Norskt

**Skeiðsnummar**: 1047.16

**ECTS**: 2

**Stig**: BA

**Endamál**: Endamálið við Norskum er at seta norska málsøgu inn í ein størri norðurlendskan samanhang. Skeiðið er ætlað sum uppískoyti til frálæruna í málsøgu við tí endamáli, at studenturin ognar sær grundleggjandi vitan um menningina hjá norskum frá umleið 1300 til nútíðina. Dentur verður lagdur á at lýsa menningina hjá nýnorskum og bókmáli og støðuna hjá teimum í norska samfelagnum.

**Innihald**: Lisið verður eitt hóskandi úrval av tekstum, sum umboða ymisk tíðarskeið, samstundis sum ymisk ástøði og háttaløg verða umrødd. Høvuðsdenturin liggur í tí málsøguliga partinum, men samtíðarlig viðurskifti, t.d. dialektir og samfelagsmálvísindi, kunnu eisini verða tikin við sum partur av frálæruni.

**Læru- og undirvísingarhættir**: Frálæran fer fram sum sjálvstøðugt intensivt skeið við gestalærara, og tí ber ikki til at áseta, nær skeiðið verður hildið. Skeiðið er 15 tímar. Undirvísingin fer í høvuðsheitum fram sum fyrilestrar, studentaframløgur og við bólkarbeiði.

**Læruúrtøka**: Studenturin skal vera førur fyri at

- greiða frá grundleggjandi málsøguligum (í minni mun dialektalum og samfelagsmálvísindaligum) fyribrigdum í norskum
- greina munir og líkleikar millum ávikavist norskt og føroyskt og millum nýnorskt og bókmál
- umrøða viðkomandi spurningar fakliga dygt og kunna miðla sína vitan um norskt munnliga eins væl og skrivliga

**Próvtøkuháttur**: Munnlig próvtøka við hálvtíma fyrireiking verður hildin, tá ið skeiðið er liðugt. Hjálparamboð eru uppgivnir tekstir og orðabøkur. Lærarin, sum hevur havt skeiðið, ella ábyrgdarlærarin hevur studentin til próvtøku.

Um studenturin fylgir 80% av tímunum og er virkin í undirvísingini, sleppur hann/hon frá próvtøku.

**Endurpróvtøka:** Eins og reglulig próvtøka.

Studentur, ið tekur eitt norðurlendskt summarskeið uttanlands (Nordkurs), kann fáa tað góðskrivað fyri tey bæði norðurlendsku skeiðini á deildini, um hann/hon vil tað.

**Próvdøming**: Innanhýsis próvdøming.

**Próvtalsstigi**: Staðið/ikki staðið.

**Lestrarlisti**: Til próvtøkuna gevur studenturin upp tað tilfar, sum lisið er á skeiðinum, ella 50 síður.

**Ábyrgd**: Zakaris S. Hansen

## Norðurlendskt mál - Íslendskt

**Skeiðsnummar**: 1048.16

**ECTS**: 2

**Stig**: BA

**Endamál**: Endamálið við Íslendskum er at seta íslendska málsøgu inn í ein størri norðurlendskan samanhang. Skeiðið er ætlað sum uppískoyti til frálæruna í málsøgu við tí endamáli, at studenturin ognar sær grundleggjandi vitan um menningina hjá íslendskum frá umleið 1300 til nútíðina.

**Innihald**: Lisið verður eitt hóskandi úrval av tekstum, sum umboða ymisk tíðarskeið, samstundis sum ymisk ástøði og háttaløg verða umrødd. Høvuðsdenturin liggur í tí málsøguliga partinum, men samtíðarlig viðurskifti, t.d. dialektir og samfelagsmálvísindi, kunnu eisini verða tikin við sum partur av frálæruni.

**Læru- og undirvísingarhættir**: Frálæran fer fram sum sjálvstøðugt intensivt skeið við gestalærara, og tí ber ikki til at áseta, nær skeiðið verður hildið. Skeiðið er 15 tímar. Undirvísingin fer í høvuðsheitum fram sum fyrilestrar, studentaframløgur og við bólkarbeiði.

**Læruúrtøka**: Studenturin skal vera førur fyri at

- greiða frá grundleggjandi málsøguligum (í minni mun dialektalum og samfelagsmálvísindaligum) fyribrigdum í íslendskum
- greina munir og líkleikar millum íslendskt og føroyskt
- umrøða viðkomandi spurningar fakliga dygt og kunna miðla sína vitan um íslendskt munnliga eins væl og skrivliga

**Próvtøkuháttur**: Munnlig próvtøka við hálvtíma fyrireiking verður hildin, tá ið skeiðið er liðugt. Hjálparamboð eru uppgivnir tekstir og orðabøkur. Lærarin, sum hevur havt skeiðið, ella ábyrgdarlærarin hevur studentin til próvtøku.

Um studenturin fylgir 80% av tímunum og er virkin í undirvísingini, sleppur hann/hon frá próvtøku.

**Endurpróvtøka:** Eins og reglulig próvtøka.

Studentur, ið tekur eitt norðurlendskt summarskeið uttanlands (Nordkurs), kann fáa tað góðskrivað fyri tey bæði norðurlendsku skeiðini á deildini, um hann/hon vil tað.

**Próvdøming**: Innanhýsis próvdøming.

**Próvtalsstigi**: Staðið/ikki staðið.

**Lestrarlisti**: Til próvtøkuna gevur studenturin upp tað tilfar, sum lisið er á skeiðinum, ella 50 síður.

**Ábyrgd**: Zakaris S. Hansen

# Bókmentasøga I

**Skeiðsnummar**: 1122.17

**ECTS:** 10

**Stig**: BA

**Endamál**: Við námsevninum vinnur studenturin sær vitan um og fatan av bókmentum í Norðurlondum frá miðøld til umleið 1876. Studenturin gerst førur fyri at lýsa bókmentirnar við atliti at tekstslagi og uppruna, at staðseta og lýsa tekstir sum sprotnar av mentanarrákum.

**Innihald**: Lisnar verða vesturnorrønar skaldsligar miðaldarbókmentir. Skaldskaparsløg í skaldskapi av manna munni í Føroyum fylla umleið ein triðing av námsevninum. Skaldsligar og yrkisligar bókmentir, sum hava livað og verið nýttar í Føroyum, og sum umboða bókmentalig rák í tíðarskeiðinum, verða viðgjørdar. Ástøðiligar bókmentir og bókmentasøguverk eru partur av viðgjørda tilfarinum.

**Læru- og undirvísingarhættir**: Undirvíst verður 3 tímar um vikuna í eina lestrarhálvu. Undirvísingin er skipað sum floksundirvísing við lærara- og studentaframløgum umframt munnligar og skrivligar venjingar, sum studentarnir gera einsæris og í bólkum.

**Læruúrtøka**: Tá ið skeiðið er lokið, skal studenturin vera førur fyri at

- Greiða frá norðurlendsku bókmentasøguni í tíðini við serligum denti á ta føroysku.
- Greiða frá føroyskum skaldskapi av manna munni.
- Greiða frá sambandinum millum tað føroyska, tað norðurlendska og altjóða útsýnið í bókmentasøguni.
- Lýsa bókmentasøguligar høvuðshendingar og høvuðsrák í tíðarskeiðinum.
- Samanbera bókmentalig snið og tey mentanarligu og samfelagsligu høpi, tey eru partar av.

**Prógtøkuháttur**: Munnlig próvtøka við hálvtíma fyrireiking. Studenturin kann hava uppgivin verk og tilfar frá undirvísingini hjá sær í fyrireikingini.

**Endurprógtøka:** Eins og reglulig próvtøka.

**Próvdøming**: Innanhýsis próvdøming.

**Próvtalsstigi**: Staðið/Ikki staðið

**Lestrarlisti**: Lestrarlistin fevnir um 3 skaldslig verk (t.d. skaldsøgu, yrkingasavn, leikrit, yrkisbók); 10 stuttar tekstir; av teimum stuttu tekstunum skulu 2 vera yrkistekstir; tekstir á minst 2 øðrum norðurlendskum málum enn føroyskum skulu vera umboðaðir.
Harafturat koma einar 400 síður av bókmentasøgu.

**Ábyrgd**: Tóta Árnadóttir

## Bókmentasøga II

**Skeiðsnummar**: 1126.18

**ECTS:** 10

**Stig**: BA

**Serligar fortreytir**: Treyt fyri at luttaka á skeiðinum er lokið skeið í Bókmentasøgu I.

**Endamál**: At geva innlit í føroyska og norðurlendska bókmentasøgu frá 1876 til í dag og at greina føroyskar og norðurlendskar bókmentir frá 1876 til okkara dagar. Skeiðið miðar ímóti, at studenturin skal kunna seta tekstirnar inn í eitt hugmynda- og bókmentasøguligt høpi.

**Innihald**: Lisnar verða føroyskar og norðurlendskar bókmentir frá 1876 til í dag við høvuðsdenti á skaldsligar bókmentir. Somuleiðis verða lisnar bókmentasøguligar viðgerðir, ritgerðir og greinir um føroyskar og norðurlendskar bókmentir. Greinir um støðuna hjá bókmentum í samfelagnum í tíðarskeiðinum eru partur av lesnaðinum. Lesturin kann verða skipaður í tíðarrað, í tíðarskeið ella eftir søguligum vegamótum; hann kann miða seg eftir listfrøðiligum, hugmyndafrøðiligum, samfelagssøguligum ella politiskum og búskaparligum viðurskiftum. Lesturin kann eisini leggjast til rættis eftir temum og tekstsløgum.

**Læru- og undirvísingarhættir**: Undirvíst verður 3 tímar um vikuna í eina lestrarhálvu. Undirvísingin er skipað sum floksundirvísing við lærara- og studentaframløgum. Studentarnir læra at nýta frøðiheiti og orða seg greitt um bókmentasøgulig evni.

**Læruúrtøka**: Tá skeiðið er lokið, er studenturin førur fyri at

- greiða frá føroyskum og norðurlendskum bókmentum í tíðarskeiðinum frá um 1876 til í dag
- lýsa bókmentasøguligar høvuðshendingar og høvuðsrák í tíðarskeiðinum
- greina bókmentatekstir og seta teir í søguligt høpi
- lýsa og viðgera sambandið millum ein ávísan tekst og tað føroyska, tað norðurlendska og altjóða útsýnið
- lýsa bókmentir sum søguligt fyribrigdi
- lýsa og meta um bókmentasøgu sum vísindi og lærugrein

**Próvtøkuháttur**: Studenturin skrivar eina bundna heimauppgávu, sum skal vera umleið 10 síður til longdar, og studenturin fær 14 dagar at skriva hana í.

**Endurpróvtøka:** Eins og reglulig próvtøka.

**Próvdøming**: Uttanhýsis próvdøming.

**Próvtalsstigi**: Galdandi próvtalsstigi.

**Lestrarlisti**: Burtur úr tí, sum lisið er á skeiðinum, ger hvør studentur sær ella saman við øðrum (í mesta lagi trý í bólki) ein lestrarlista, sum er próvtøkutilfar. Listin skal umfata 3 skaldslig verk (eitt á øðrum máli enn føroyskum) og 10 stuttar tekstir; av stuttu tekstunum skulu 2 vera yrkistekstir, og tekstir á øðrum norðurlendskum máli enn føroyskum skulu vera umboðaðir. Skaldsligu verkini og stuttu tekstirnir skulu hava hóskandi spjaðing við atliti at upprunatíð og tekstslagi.

Harafturat koma 400 síður av bókmentasøgu, sum bæði yvirlitskent og dýpandi viðgera føroyskar og aðrar norðurlendskar bókmentir í tíðarskeiðinum; har uppi í eru viðgerðir av bókmentasøgu sum tekstslag.

**Ábyrgd**: Bergur D. Hansen

# Bókmentagreining I

**Skeiðsnummar: 1134.18**

**ECTS:** 5

**Stig**: BA

**Endamál**: Studenturin skal ogna sær undirstøðukunnleika um tekstgreining við serligum denti á at greina eitt av teimum fagurbókmentaligu tekstsløgunum og ogna sær kunnleika um greiningarhugtøk, serliga við atliti at einum av teimum fagurbókmentaligu tekstsløgunum. Dentur verður lagdur á, at studenturin lærir seg hegnið at greina eitt av teimum fagurbókmentaligu høvuðstekstsløgunum og at nýta greiningarhugtøk í hesum sambandi.

**Innihald**: Lisnar verða grundbókmentir í tekstgreining, serliga við atliti at einum av teimum fagurbókmentaligu høvuðstekstsløgunum. Lisin og greind verða ymisháttað dømi um serliga eitt av teimum fagurbókmentaligu tekstsløgunum.

**Læru- og undirvísingarhættir**: Undirvíst verður 2 tímar um vikuna í eina lestrarhálvu. Undirvísingin er skipað sum floksundirvísing við lærara- og studentaframløgum, skrivligum venjingaruppgávum og bólkarbeiði.

**Læruúrtøka**: Studenturin skal duga at

- greina skaldsligar tekstir av einum av høvuðstekstsløgunum
- greiða frá eyðkennunum hjá einum av høvuðstekstsløgunum
- lýsa tilgongdina í egnum tekstgreiningum í einum av høvuðstekstsløgunum
- miðla greiningarúrslit innan fyri eitt av høvuðstekstsløgunum
- seta fram greiningarúrslit um eitt av høvuðstekstsløgunum munnliga og skrivliga í hóskandi málsligum búna.

**Próvtøkuháttur**: Skrivlig próvtøka í 4 tímar í ókendum teksti, sum verður útflýggjaður. Loyvd hjálparamboð: Allar orðabøkur.

**Endurpróvtøka**: Eins og reglulig próvtøka.

**Próvdøming**: Innanhýsis próvdøming.

**Próvtalsstigi**: Staðið/ikki staðið

**Ábyrgd**: Bergur D. Hansen

## Bókmentagreining II

**Skeiðsnummar**: 1135.18

**ECTS**: 5

**Serligar fortreytir**: Treyt fyri at luttaka á skeiðinum er, at studenturin hevur lokið skeiðið í Bókmentagreining I.

**Stig**: BA

**Endamál**: Studenturin skal ogna sær hollan kunnleika um greiningarhugtøk og tekstgreining við serligum denti á at greina tvey av teimum fagurbókmentaligu høvuðstekstsløgunum gjølla og harumframt hegni at greina høvuðseyðkennini í yrkisteksti.

**Innihald**: Lisnar verða grundbókmentir í tekstgreining, serliga við atliti at tveimum av teimum fagurbókmentaligu høvuðstekstsløgunum. Lisin og greind verða ymisháttað dømi um serliga tvey av teimum fagurbókmentaligu tekstsløgunum og haraftrat dømi um yrkislig tekstsløg.

**Læru- og undirvísingarhættir**: Undirvíst verður 2 tímar um vikuna í eina lestrarhálvu. Undirvísingin er skipað sum floksundirvísing við lærara- og studentaframløgum, skrivligum venjingaruppgávum og bólkarbeiði.

**Læruúrtøka**: Studenturin skal duga at

- greina skaldsligar tekstir av tveimum av høvuðstekstsløgunum gjølla og haraftrat yrkisligar tekstir í høvuðsheitum
- greiða gjølla frá eyðkennunum hjá tveimum av høvuðstekstsløgunum og haraftrat eyðkennunum hjá yrkisligum tekstum í høvuðsheitum
- lýsa tilgongdina í egnum tekstgreiningum í tveimum av skaldsligu høvuðstekstsløgunum og haraftrat yrkisligum teksti
- seta fram greiningarúrslit um tvey av skaldsligu høvuðstekstsløgunum og haraftrat yrkisligan tekst munnliga og skrivliga í hóskandi málsligum búna.

**Próvtøkuháttur**: Skrivlig próvtøka í 5 tímar í ókendum teksti, sum verður útflýggjaður. Loyvd hjálparamboð: Allar orðabøkur.

**Próvdøming:** Uttanhýsis próvdøming.

**Próvtalsstigi:** Galdandi próvtalsstigi.

**Ábyrgd**: Bergur D. Hansen

## Bókmentafrøði

**Skeiðsnummar**: 1136.17

**ECTS**: 5

**Stig**: BA

**Endamál**: At fáa kunnleika um bókmentafrøðilig háttaløg og førleika at greiða frá ástøði, grundum, próvførslu, mannagongdum og endamálum teirra.

**Innihald**: Bókmentafrøðilig háttaløg verða viðgjørd og dømi løgd fram til tess at lýsa ástøði, mannagongdir og endamál teirra. Til dømis kunnu nýkritikkur og strukturalisma verða viðgjørd; eisini kunnu hugmyndafrøðilig, hugmyndasøgulig, sálarfrøðilig, móttøkufrøðilig, post-kolonial ella onnur háttaløg og sjónarhorn verða viðgjørd. Kannað verður, hvussu ymiskt tey viðgjørdu háttaløgini greina og tí eisini fata bókmentir listfrøðiliga (estetiskt), hugmyndafrøðiliga og samskiftisliga.
Hugt verður at valdum bókmentaritgerðum og –greinum við atliti at spurninginum um, hvørji háttaløg tær umboða.

**Læru- og undirvísingarhættir**: Undirvíst verður 2 tímar um vikuna í eina hálvu. Undirvísingin er skipað sum floksundirvísing við lærara- og studentaframløgum og bólkaarbeiði. Studentarnir skulu skriva eina 14-dagauppgávu ella tvær vikuuppgávur um evni, sum lærarin ásetir.

**Læruúrtøka**: Studenturin skal duga at

- lýsa bókmentafrøðilig háttaløg og seta tey í søguligt høpi
- greiða frá bókmentafrøðiligum háttalagi í valdum bókmentaritgerðum

**Próvtøkuháttur**: Studenturin skrivar eina bundna heimauppgávu, sum skal vera uml. 5-7 síður til longdar, og studenturin fær 14 dagar at skriva hana í.

**Endurpróvtøka**: Eins og reglulig próvtøka.

**Próvdøming:** Uttanhýsis próvdøming.

**Próvtalsstigi:** Galdandi próvtalsstigi.

**Lestrarlisti:** Lestrarlistin skal vera umleið 200 síður av bókmentafrøðiligum ástøði og bókmentaritgerðum til samans.

**Ábyrgd**: Malan Marnersdóttir

## Samskifti og fjølmiðlar

**Skeiðsnummar**: 1212.18

**ECTS**: 5

**Stig** BA

**Endamál**: At ogna sær kunnleika um samskifti og miðlar, harundir miðlasøgu, miðlasløg, ástøði um miðlar, miðlagreining og háttaløg. Harumframt verður dentur lagdur á at skilja samspælið millum miðlar og mentan og at ogna sær førleika at skilmarka, greina, tulka og kritiskt viðgera fjølmiðlatekstir í samskiftishøpi teirra (heitið ‘tekstur’ sipar her til ymisk miðlaútlát, t.d. prentaðar ella munnligar tekstir, nettekstir, myndir, ljóð/myndainnsløg og sendingar).

**Innihald**: Lærugreinin gevur innlit í høvuðshugtøk, -ástøði og -háttaløg í samspælinum millum mentan og miðlar í nútíðar norðurlendskum og alheims samteksti. Lisnar verða grundbókmentir um samskifti og miðlar við klassiskum og samtíðarligum frumtekstum sum dømi. Umrøddir verða prentmiðlar, loftmiðlar, netmiðlar og nútíðar samvirknir sosialir miðlar við atliti at framkomu, menning og týdningi teirra í modernaða samfelagnum. Evnisøki kunnu vera eitt nú tíðindaflutningur, dokumentar, føroyska flokspressan, netbornir sosialir miðlar, bloggar, klassisk frásøgusnið í nútíðar miðlum, miðlar og fólkaræði, politiskt samskifti og spunasmíð, lýsingarsamskifti. Við støði í viðkomandi ástøði og háttaløgum verða valdir tekstir, myndir, sendingar og innsløg greinað og kritiskt viðgjørd í samskiftishøpi teirra.

**Læru- og undirvísingarhættir**: Undirvíst verður 2 tímar um vikuna í eina lestrarhálvu. Undirvísingin er skipað sum floksundirvísing við lærara- og studentaframløgum og venjingum.

**Læruúrtøka**: Studenturin skal duga at

- greiða frá týðandi samskiftis- og fjølmiðlaspurdómum
- greiða frá týðandi ástøði um samskifti og fjølmiðlar í mentanarligum samteksti
- greina fjølmiðlatekstir og viðgera teir í samskiftishøpi teirra við støði í viðkomandi ástøði og háttaløgum
- vísa hugtaksliga fatan av miðlasniðum og valdum tekstum í teirra mentanarliga og samfelagsliga høpi
- grundgeva fyri og meta um vald ástøði og háttaløg í greining av tekstum

**Próvtøkuháttur**: Munnlig próvtøka við hálvtíma fyrireiking. Studenturin kann hava uppgivin verk og tilfar frá undirvísingini hjá sær í fyrireikingini.

**Endurpróvtøka:** Eins og reglulig próvtøka.

**Próvdøming:** Uttanhýsis próvdøming.

**Próvtalsstigi:** Galdandi próvtalsstigi.

**Lestrarlisti:** 2 vísindalig verk um ástøði ella háttaløg fyri samskiftisgreining og 1 verk og 7 tekstir, ið umboða ymisk samskiftis- og fjølmiðlasløg; talan kann vera um skrivaðar tekstir, ljóð- og myndainnsløg, sendingar, myndir og privatar tekstir.

**Ábyrgd**: Bjarni Arge/Zakaris S. Hansen

## Vísindaástøði

**Skeiðsnummar**: 1221.15

**ECTS**: 10

**Stig**: BA

**Endamál**: At ogna sær grundleggjandi kunnleika um vísindaástøði við denti á tí, sum hevur týdning fyri hugvísindi. Í undirvísingini verður miðað eftir, at studenturin skal fáa innlit í søguligu gongdina í viðurskiftum millum vísindi, heimspeki og samfelag, men skal harumframt eisini kenna høvuðsinnihaldið í vísindaástøðiligum stevnum, sum hava týdning í vísindaligum orðaskifti um hugvísindi. Dentur verður lagdur á at kenna høvuðsinnihald, ástøði og menningarleiðir í hugvísindum og at fáa eina grundleggjandi fatan av, hvussu skyldar vísindagreinir arbeiða. Studenturin skal læra seg at hugsa kritiskt um ástøði.

**Innihald**: Grundleggjandi kunnleiki um almenn vísindaástøði, serliga tað, ið hevur týdning fyri hugvísindi. Ymisk vísindaástøði verða viðgjørd, eins og søgan hjá hugvísindum. Studenturin skal vinna sær førleika til at meta um vísindaástøðiligar stevnur og hvussu vísindaástøðilig sjónarmið ávirka gransking innan hesi fak.

**Læru- og undirvísingarhættir**: Undirvíst verður 2 tímar um vikuna í eina hálvu. Undirvísingin er skipað sum floksundirvísing við fyrilestrum, framløgum og kjaki.

Lisnar verða grundbókmentir og valdir frumtekstir, sum tilsamans eru inngangur til vísindaástøðiligar spurningar.

**Læruúrtøka**: Tá ið skeiðið er liðugt, skal studenturin vera førur fyri at

- seta orð á høvuðsinnihaldið í viðkomandi vísindaligum stevnum
- lýsa líkleikar og munir millum ymiskar vísindaligar stevnur
- seta atfinningarsamar spurningar til vísindaligar stevnur
- vísa hvussu ymiskar vísindaligar stevnur kunnu geva íblástur til ávís fakøki
- greina vísindaligar stevnur við atliti at heimspekiliga grundstøðinum
- seta vísindaástøði inn í hugvísindaligan samanhang

**Próvtøkuháttur**: Skrivlig próvtøka í 5 tímar. Til próvtøkuna eru øll hjálparamboð loyvd.

**Endurpróvtøka:** Eins og reglulig próvtøka.

**Próvdøming**: Innanhýsis próvdøming.

**Próvtalsstigi**: Staðið/ikki staðið.

**Lestrarlisti:** Lestrarlisti verður útflýggjaður við lestrarbyrjan. Umleið 800 síður verða lisnar á skeiðinum.

**Ábyrgd**: Jógvan D. Hansen/Zakaris S. Hansen

## Vegleiðandi yvirlit yvir lærugreinir á fyrra parti

**tímabýti – próvtøka – endurpróvtøka – døming – próvtøkustigi**

| Lestrarhálvur: | 1. | 2. | 3. | Próvtøka: | Endurpróvtøka: | Dømd: | Stigi: |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tímar um vikuna: | | | | | | | |
| Ljóð- og formlæra<br>10 ECTS | 2 | | | 4 tímar skrivlig | sama | Innanhýsis | Staðið/<br>Ikki staðið |
| Málsøga<br>8 ECTS | | 4 | | 3 tímar skrivlig + 3 dg. bundin heimauppgáva | 5 tíma skrivlig | Uttanhýsis | Próvtal |
| Norðurlendsk mál*<br>2+2 ECTS | X | | X | 80% luttøka/<br>munnlig próvtøka | munnlig próvtøka | Innanhýsis | Staðið/<br>Ikki staðið |
| Norrønt<br>10 ECTS | | 4 | | 5 tímar skrivlig | sama | Uttanhýsis | Próvtal |
| Setninga- og merkingarfrøði<br>8 ECTS | | | 3 | 5 tímar skrivlig | sama | Uttanhýsis | Próvtal |
| Bókmentafrøði<br>5 ECTS | | | 2 | 2 vikur bundin heimauppgáva | sama | Uttanhýsis | Próvtal |
| Bókmentagreining I<br>5 ECTS | 2 | | | 4 tímar skrivlig | sama | Innanhýsis | Staðið/<br>Ikki staðið |
| Bókmentagreining II<br>5 ECTS | | 2 | | 5 tímar skrivlig | sama | Uttanhýsis | Próvtal |
| Bókmentasøga I<br>10 ECTS | 3 | | | Munnlig próvtøka við hálvtíma fyrireiking | sama | Innanhýsis | Staðið/<br>Ikki staðið |
| Bókmentasøga II<br>10 ECTS | | 3 | | 2 vikur bundin heimauppgáva | sama | Uttanhýsis | Próvtal |
| Samskifti og fjølmiðlar<br>5 ECTS | 2 | | | Munnlig próvtøka við hálvtíma fyrireiking | sama | Uttanhýsis | Próvtal |
| Vísindaástøði<br>10 ECTS | | | 2 | 5 tímar skrivlig | sama | Innanhýsis | Staðið/<br>Ikki staðið |

*Skeiðini eru umleið 15 tímar hvørt.
Av tí at frálæran fer fram sum sjálvstøðug skeið við gestalærarum, ber ikki til at áseta leingi frammanundan, nær skeiðini verða hildin.

## BA - seinni partur

Eftir at hava staðið fyrra partin, kann studenturin fara undir seinna partin. Seinni partur er samansettur av lestrarevnum og BA-ritgerð.

### Undantøk í upptøkutreytum til BA-evni

Tað ber til at søkja um upptøku á einstøk skeið á seinna parti á BA uttan at hava staðið fyrra part av BA frá Føroyamálsdeildini. Til tess krevst, at umsøkjarin hevur lokið 2 ára universitetsnám/BA í hóskandi grein/greinum. Eftir at hava staðið próvtøku við skeiðslok fær studenturin útskrift úr próvbókini við úrslitinum. Studentar, ið eru innskrivaðir eftir hesi undantaksreglu, fáa ikki, við at taka eina ávísa nøgd av stigum, fult BA-prógv frá Føroyamálsdeildini.

### Lestrarevni

Undirvísingin á seinna partinum er skipað í lestrarevni (sí Allýsing av lestrarevnum s. 39). Studenturin velur frítt millum tey lestrarevni, sum eru í boði. Fyri hvørja hálvu velja studentarnir, hvørji lestrarevni, teir ynskja at taka, av teimum, sum eru í boði. Um tað vísir seg, at teir ikki ynskja at fara til próvtøku í onkrum av valdu lestrarevnunum, mugu teir gera vart við tað skrivliga innan ein mánað eftir, at undirvísingin er byrjað. Lestrarevni eru bókmentalig, málslig ella samansett. Tey kunnu vera ymisk til støddar, og studenturin skal taka til samans 70 ECTS í lestrarevnum. Studenturin kann taka skeið á øðrum deildum á Setrinum og á øðrum universitetum eftir avtalu, sí s. 39, Góðskriving.

### Øking av lestrarevni

Studentur kann í samráði við ábyrgdarlærara økja lestrarevni í mun til skeiðslýsing. Studenturin fær leiðbeining til sjálvur at lesa og granska tann partin, ið lagdur verður aftur at lestrarevninum. Økingin skal góðkennast av útbúgvingarleiðaranum og innskriving til próvtøku avgreiðast innan 1. oktober/1. mars.

### Lestrarlistar til bókmentalig evni á BA:

*20 ECTS:* Í lestrarevnum, sum telja 20 ECTS, verða uppgivin 4 vísindaverk og 7 bókmentaverk.
*10 ECTS:* Í lestrarevnum, sum telja 10 ECTS, verða uppgivin 2 vísindaverk og 4 bókmentaverk.
Í stakføri kunnu **tekstir** (s. 40) á øðrum málum enn norðurlendskum verða tiknir við. Vísindaverkini kunnu vera á øðrum málum enn norðurlendskum. Til 10 ECTS krevst, at minst eitt av vísindaverkunum skal vera ein heil vísindaritgerð.
Lestrarevni av aðrari stødd verða roknað samsvarandi hesum.

### Lestrarlistar til málslig og samansett evni á BA:

Bæði tey málsligu og tey samansettu lestrarevnini eru so ymislig, at illa ber til at seta føst krøv um tilfarsnøgd. Vegleiðandi ásetingar eru:
*20 ECTS:* Í lestrarevnum, ið telja 20 ECTS, verða uppgivnar uml. 1000 síður.
*10 ECTS:* Í lestrarevnum, ið telja 10 ECTS, verða uppgivnar uml. 500 síður.
Tó kann býtið millum tey trý tilfarssløgini, alment ástøði, serbókmentir og grundtekstir (sí s. 39), skifta frá einum lestrarevni til annað. Øll tilfarssløgini skulu vera umboðað við einum verki ella minst 100 síður. Í summum, eitt nú mállæru, navnafrøði o.tíl., kann meginparturin vera innan ástøði, háttalag og viðgerð av ávísum evnum; í øðrum, eitt nú norrønum og málsøgu, kann høvuðsdentur liggja á tekstlestri. Í einum lestrarevni, sum snýr seg um samskifti, kunnu partar av tilfarinum vera myndir og annað líknandi tilfar. Krøvini verða ásett í hvørjum føri.
Lestrarevni av aðrari stødd verða roknað samsvarandi hesum.

## Sjálvlestur

Studentur kann sjálvur seta sær eitt lestrarevni saman. Sjálvlestrarevnið skal vera 10 ECTS. Loyvt er bert at gera eitt lestrarevni í BA-lestrinum. Útbúgvingarleiðarin skal góðkenna evnið, ECTS og leiðbeinara.
Lestrarlisti í sjálvlestrarevnum skal í vavi og samanseting samsvara við lestrarlistar til vanlig lestrarevni á BA. Leiðbeinarin skal góðkenna lestrarlistan undan próvtøkuni. Tá hetta er avgreitt, skal studenturin skriva seg inn til próvtøku innan 1. oktober/1. mars.
Próvtøkan kann ikki vera heimauppgáva, men má vera munnlig ella skrivlig próvtøka.
Tó kunnu lærarar eisini søkja um at royna nýggjar próvtøkuhættir, sum ikki eru lýstir í námsskipanini. Í slíkum førum skal lærarin leggja eina skrivliga umsókn við grundgevingum fyri útbúgvingarleiðaran. Avgerðin hjá útbúgvingarleiðaranum skal síðani staðfestast í Lestrarráðnum. Eftir skeiðslok og próvtøku skal lærarin senda Lestrarráðnum eina eftirmeting.

## BA-ritgerð

BA-útbúgvingin endar við BA-ritgerð, sum telur 20 ECTS. Studenturin skal granska eitt námsevni og skriva eina ritgerð um tað, 25-30 síður til longdar. BA-ritgerðin eigur at prógva evnini hjá studentinum at greina og nýta vísindaligt ástøði og háttalag í arbeiðinum við einum avmarkaðum evni. BA-ritgerðin kann vanliga ikki viðgera sama evni, sum hevur verið brúkt sum uppgávuevni ella próvtøkuevni í BA-náminum.
Studenturin velur evnið í samráð við leiðbeinara, sum er eitt av vísindastarvsfólkunum á deildini, og útbúgvingarleiðarin skal góðkenna, og dekanurin skal staðfesta evnið.
Til ber eisini at gera BA-ritgerð í bólki (í mesta lagi tríggir studentar kunnu skriva ritgerðina saman). Sí annars s. 41, Bólka- og einstaklingsuppgávur.

## Innlating av BA-ritgerð og møguligar seinkingar

BA-ritgerðin verður skrivað í 6. lestrarhálvu og latin inn við endan á hálvuni.
Um studenturin ikki letur BA-ritgerðina inn til tíðina, kann heitið snarast, og studenturin fær 2 mánaðir afturat til ritgerðina. Um hann heldur ikki letur inn tá, kann heitið snarast eina ferð afturat, og studenturin fær 2 mánaðir afturat. Um hann heldur ikki letur inn tá, hevur hann brúkt allar tríggjar møguleikarnar.
Um seinkingar so sum barnsburðarfarloyvi og sjúka eru í lestrinum, er evsta mark at lata BA-ritgerðina inn 1 ár eftir seinasta próvtøkudagin. Serlig avtala má tá gerast við útbúgvingarleiðaran. Um studenturin ikki letur inn tá, kann hann søkja um loyvi at lata inn seinni. Hann kann søkja um loyvi at skriva um sama evni, sum hann møguliga hevur fingið staðfest. Um nevndu mannagongdir og freistir ikki verða hildnar, verður studenturin útskrivaður uttan endaligt prógv.

# Námsskipan fyri MA-nám

## MA-nám

Staðið MA-prógv gevur rætt til heitið *magister artium*, stytt MA. Lokið MA-prógv við góðum úrsliti gevur møguleika fyri at fara undir ph.d.-nám.

**MA-nám á Føroyamálsdeildini eru hesi:**

- MA í føroyskum (120 ECTS)
- MA í føroyskum bókmentum (120 ECTS)
- MA í føroyskum máli (120 ECTS)
- Samansett MA (BA + Høvuðsritgerð á 30 ECTS + Hjánám)

## Lýsing av útbúgvingini

**MA-nám í føroyskum máli og bókmentum**

*Master of Arts in Faroese language and literature*

| | |
|---|---|
| Slag av útbúgving og áramál | Tvey ára nám í føroyskum – 120 ECTS |
| Útbúgvingarstovnur | Fróðskaparsetur Føroya<br>*University of Faroe Islands* |
| Stovnur, ið góðkennir útbúgvingar | Mentamálaráðið (MMR) |
| Tíðarbil víst verður til | Námsskipan fyri føroyskt, ið er galdandi frá september 2015 |
| Stig | MA, "2nd Cycle" sambært EQF – LLL og QF – EHEA stig 7. |

| A: Endamál |
|---|
| MA-útbúgving í føroyskum veitir kunnleika á høgum akademiskum stigi í vísindaligum lærugreinum í føroyskum. Útbúgvingin mennir evnini hjá studentunum til kritiska støðutakan og sjálvstøðugt vísindaligt arbeiði. |

| B: Eyðkenni | |
|---|---|
| **1: Grein/evnisøki** | Námsevnið er føroyskt mál og føroyskar bókmentir. Undirvísingin er skipað í lestrarevni, har ið studenturin velur millum tey evni, sum eru í boði (tilsamans 80 ECTS). Endað verður við eini MA-ritgerð (40 ECTS, íroknað fyrilestur). Tilsamans 120 ECTS. |
| **2: Almennur/serligur dentur** | Áherðsla verður løgd á dýpdarkunnleika um føroyskt mál og bókmentir. Harumframt verður dentur lagdur á at menna førleikar at nýta viðkomandi vísindalig hugtøk, háttaløg og ástøði kritiskt. |

| | |
|---|---|
| **3: Kós** | Útbúgvingin er granskingargrundað og miðar móti gransking, undirvísing, miðla- og mentanarvirksemi á høgum førleikastigi. |
| **4. Serlig eyðkenni** | Tað eyðkennir útbúgvingina, at føroyskt mál og bókmentir verða viðgjørd vísindaliga í norðurlendskum og altjóða høpi. Studenturin kann taka bókmentalig evni burturav, málslig evni burturav ella eina blanding av málsligum og bókmentaligum evnum. Til ber at taka 60 ECTS á øðrum deildum ella universitetum ella sum sjálvlisin evni. |

| C: Starvsmøguleikar og framhaldsútbúgving | |
|---|---|
| **1: Starvsmøguleikar** | Prógvið gevur undirvísingarførleika á miðnámsskúlastigi umframt starvsmøguleikar á almennum og privatum stovnum, miðlum og vinnuvirkjum. Útbúgvingin gevur rætt til heitið magister artium, stytt MA. |
| **2: Framhaldsútbúgving** | MA-prógv í føroyskum gevur møguleika fyri ph.d.-lestri í Føroyum og uttanlands. |

| D: Útbúgvingarháttur | |
|---|---|
| **1: Arbeiðslag í sambandi við læru- og undirvísing** | Undirvísingarhættirnir eru fyrilestrar, studentaframløgur og orðaskifti, skrivligar uppgávur, bólkarbeiði, venjingar, feltarbeiði umframt sjálvstøðugan lestur. Fjórða hálva er sett av til MA-ritgerð við leiðbeining. |
| **2: Próvtøkuhættir** | Endamálið við próvtøkuni er at meta, um fakligi førleikin svarar til ásetingarnar um læruúrtøku í námsskipanini. Próvtøkurnar eru munnligar og skrivligar próvtøkur, heimauppgávur við fríum og bundnum evni og samanseting av skrivligari ella munnligari próvtøku og heimauppgávu. |

### E: Útbúgvingarførleikar

**1: Almennir førleikar**

- Granskingarførleiki: arbeiða skipað og samvitskufult við vísindaligum dátum
- Samskiftishegni: samskifta tilvitað og greitt á ymsum stigum
- Upplýsingarmiðlan: greitt og beinrakið at leggja fram fjøltáttaða vitan í talu og skrift
- Støðulýsing: gera eina neyva lýsing av eini ávísari støðu ella øki
- Toymisarbeiði: arbeiða sjálvstøðugt saman við øðrum og taka á seg ábyrgd av uppgávum
- Greiðsluevni: loysa ítøkiligar spurningar á dyggan hátt

**2: Fakligir førleikar**

- Skilja og meta um ástøði og háttaløg og nýta tey í mál- og/ella bókmentafrøðiligum arbeiði við føroyskum
- Duga at leita fram og meta um tilfar úr ymiskum heimildum um føroyskt (skrivligum, munnligum og elektroniskum) og at skipa og viðgera tað vísindaliga
- Kenna menningina av føroyskum sum undirvísingar- og granskingargrein
- Vera før/ur fyri neyvt at nýta hugtøk, yrkisheiti og fakligan málburð hjá frøðigreinini føroyskum
- Duga at miðla fakliga vitan um føroyskt í vísindaligum og almennum høpi

## F: Fullfíggjaður listi við læruúrtøkuni frá útbúgvingini:

Studenturin hevur prógvað, at hon/hann er før/ur fyri at

- Savna og arbeiða við málsligum og bókmentaligum dátum og megnar at skipa og greina tær
- Viðgera og meta um høvuðstættir í føroyskari mál- og bókmentasøgu og bera saman við høvuðstættir í norðurlendskari mál- og bókmentasøgu
- Greina og meta um tekstir við støði í bókmenta- og/ella samskiftisvísindaligum ástøðum
- Viðgera og taka støðu til frøðiligar tekstir um mál og bókmentir
- Skriva vísindaligar greinir um føroyskt mál og bókmentir
- Leggja fram munnliga um føroyskt mál og bókmentir grundað á vísindaliga vitan á økinum
- Leggja fram munnliga á máli, ið hóskar í samskiftisstøðuni
- Finna fram hóskandi tilfar til undirvísing í ávísum evnum í føroyskum máli og bókmentum
- Nýta ástøði og háttaløg á nýggjum evnisøkjum
- Á kritiskum grundarlagi duga at taka upp og taka lut í orðaskifti um dygd í máli, bókmentum og øðrum tekstum
- Ráðgeva um góðan málburð og vælvirkandi samskifti á føroyskum
- Lýsa og meta um tekstir (bæði fagurbókmentir og/ella yrkisbókmentir) í mun til mállæruligar reglur, retoriskar meginreglur og fagurfrøðiligar normar

# MA í føroyskum

MA í føroyskum tekur 2 ár (120 ECTS) og er samansett av lestrarevnum og MA-ritgerð. Lestrarevnini telja 80 ECTS, ritgerðin saman við fyrilestri telur 40 ECTS. Lærarar á deildini og gestalærarar bjóða fram lestrarevni, sum studentarnir velja ímillum.

## Upptøkukrøv

Studentur, sum hevur lokið BA-prógv í føroyskum við góðum úrsliti (svarar til minst 5,8 í miðal eftir 7-talsstiganum/8 í miðal eftir 13-talsstiganum), kann søkja um upptøku á MA-námið.

## Onnur upptøkukrøv:

Umsøkjarar við góðum BA-prógvi í øðrum málum og bókmentum kunnu verða upptiknir eftir treytum, sum verða ásettar nærri í hvørjum einstøkum føri.

## Stakgreinalestur

Stakgreinalesandi eru studentar, sum fylgja undirvísing og fara til próvs í einstøkum lærugreinum/skeiðum, uttan at vera innskrivaðir til fullan lestur.
Stakgreinalesandi søkja um upptøku til hvørt skeið sær og skulu lúka somu krøv til upptøku sum aðrir studentar.
Stakgreinalesandi kunnu verða tikin upp, um pláss er á skeiðinum.
Gjald er fyri stakgreinalestur. Skeiðsgjaldið er fyri undirvísing, vegleiðing, próvtøku og umsiting.
Søkt verður um upptøku til stakgreinalestur við serstøkum umsóknarblaði.
Fulltíðarlesandi á Setrinum kunnu taka stakskeið á øðrum útbúgvingum á Setrinum uttan at gjalda.

## Undantøk í upptøkutreytum til MA-evni

Tað ber til at søkja um upptøku á einstøk skeið á MA-stigi uttan at hava BA-prógv frá Føroyamálsdeildini. Til tess krevst, at umsøkjarin hevur lokið BA- ella MA-nám í hóskandi grein/greinum. Eftir at hava staðið próvtøku við skeiðslok fær studenturin útskrift úr próvbókini við úrslitinum. Studentar, ið eru innskrivaðir eftir hesi undantaksreglu, fáa ikki, við at taka eina ávísa nøgd av stigum, fult MA-prógv frá Føroyamálsdeildini.

## Lestrarevni

Undirvísingin er skipað í lestrarevni (sí Allýsing av lestrarevnum s. 39). Fyri hvørja lestrarhálvu velja studentarnir, hvørji lestrarevni, teir ynskja at taka, av teimum, sum eru í boði. Um tað vísir seg, at teir ikki ynskja at fara til próvtøku í onkrum av valdu lestrarevnunum, mugu teir gera vart við tað skrivliga innan ein mánað eftir, at undirvísingin er byrjað. Lestrarevnini eru bókmentalig, málslig ella samansett. Studenturin velur millum tey evni, sum eru í boði; hann kann taka bókmentalig evni burturav, málslig evni burturav ella eina blanding av málsligum og bókmentaligum evnum. Studenturin kann taka skeið á øðrum deildum á Setrinum og á øðrum universitetum eftir avtalu, sí s. 39, Góðskriving.

## Øking av lestrarevni

Studentur kann í samráði við ábyrgdarlærara økja lestrarevni í mun til skeiðslýsing. Studenturin fær leiðbeining til sjálvur at lesa og granska tann partin, ið lagdur verður aftur at lestrarevninum. Økingin skal góðkennast av útbúgvingarleiðaranum og innskriving til próvtøku avgreiðast innan 1. oktober/1. mars.

## Lestrarlisti til bókmentalig evni á MA:

*20 ECTS:* Í lestrarevnum, sum telja 20 ECTS, verða uppgivin 5 vísindaverk og 8 bókmentaverk.
*10 ECTS:* Í lestrarevnum, sum telja 10 ECTS, verða uppgivin 3 vísindaverk og 4 bókmentaverk.
Í stakføri kunnu tekstir (s. 40) á øðrum málum enn norðurlendskum verða tiknir við. Vísindaverkini kunnu vera á øðrum málum enn norðurlendskum. Minst tvey/eitt av vísindaverkunum skulu um gjørligt vera heilar vísindaritgerðir.

Lestrarevni av aðrari stødd verða roknað samsvarandi hesum.

## Lestrarlisti til málslig og samansett evni á MA:

Bæði tey málsligu og tey samansettu lestrarevnini eru so ymislig, at illa ber til at seta føst krøv um tilfarsnøgd. Vegleiðandi ásetingar eru:
*20 ECTS:* Í lestrarevnum, sum telja 20 ECTS, verða uppgivnar uml. 1.500 síður.
*10 ECTS:* Í lestrarevnum, sum telja 10 ECTS, verða uppgivnar uml. 800 síður.
Tó kann býtið millum tey trý tilfarssløgini, alment ástøði, serbókmentir og grundtekstir (sí s. 39), skifta frá einum lestrarevni til annað. Øll tilfarssløgini skulu vera umboðað við einum verki ella minst 100 síðum. Í summum, eitt nú mállæru, navnafrøði o.tíl., kann meginparturin vera innan ástøði, háttalag og viðgerð av ávísum evnum; í øðrum, eitt nú norrønum og málsøgu, kann høvuðsdenturin liggja á tekstlestri. Í einum lestrarevni, sum snýr seg um samskifti, kunnu partar av tilfarinum vera myndir. Krøvini verða ásett í hvørjum føri.
Lestrarevni av aðrari stødd verða roknað samsvarandi hesum.

## Sjálvlestur

Studentur kann sjálvur seta sær eitt lestrarevni saman. Sjálvlestrarevnið skal vera 10 ECTS. Loyvt er bert at gera eitt sjálvlestrarevni í MA-lestrinum. Útbúgvingarleiðarin skal góðkenna evnið, ECTS og leiðbeinara.
Lestrarlisti í sjálvlestrarevnum skal í vavi og samanseting samsvara við lestrarlistar til vanlig lestrarevni á MA.
Leiðbeinarin skal góðkenna lestrarlistan undan próvtøkuni. Tá hetta er avgreitt, skal studenturin skriva seg inn til próvtøku innan freistirnar, 1. oktober/1. mars.
Próvtøkan kann ikki vera heimauppgáva, men má vera munnlig ella skrivlig próvtøka.

## Ráðstevnuluttøka

MA-studentur kann fáa ECTS fyri at taka lut á ráðstevnu um norðurlendsk mál og norðurlendskar bókmentir. Hvør ráðstevna kann verða góðskrivað við 1, 2 ella 3 ECTS alt eftir vavi. MA-studentur kann í mesta lagi fáa 5 ECTS til samans fyri ráðstevnuluttøku.
Góðskriving er treytað av, at studenturin skrivar eina 5-10 síður langa frágreiðing um ráðstevnuna. Frágreiðingin skal lýsa ráðstevnuna, taka fram góðar og minni góðar partar, tá ið tað er relevant, og leggja dent á fakliga úrtøku viðvíkjandi háttaløgum, ástøði o.tíl. Góðskrivingin verður mett sum staðin ella ikki staðin.
Studenturin skal søkja um at fáa luttøkuna fyribils góðkenda, áðrenn hann fer á ráðstevnuna. Í samráði við lærara á deildini skrivar hann umsókn til lestrarráðið, sum lýsir ráðstevnuevnið, fyrireikararnar og væntaða úrslitið. Endaliga góðkenningin og góðskrivingin verða staðfest, tá ið frágreiðingin frá ráðstevnuni er góðkend av útbúgvingarleiðaranum.
Ráðstevnur eru í hesum viðfangi akademiskar mál- og bókmentafrøðiligar ráðstevnur, fyrilestrarrøðir, seminar, symposium, sum viðurkendir granskarar stíla fyri við vísindaligum samskifti fyri eyga.

## MA-ritgerð

MA-námið endar við MA-ritgerð (38 ECTS) og fyrilestri (2 ECTS). Ritgerðin skal vera 80-120 síður.
MA-ritgerðin verður skrivað í 4. lestrarhálvu og latin inn við endan á hálvuni. Um seinkingar so sum barnsburðarfarloyvi og sjúka eru í lestrinum, er evsta mark at lata MA-ritgerðina inn 1 ár eftir seinasta próvtøkudagin. Serlig avtala má tá gerast við vegleiðaran. Um studenturin ikki letur inn tá, kann hann søkja um loyvi at lata inn seinni. Hann kann søkja um loyvi at skriva um sama evni, sum hann møguliga hevur fingið staðfest. Um nevndu mannagongdir og freistir ikki verða hildnar, verður studenturin útskrivaður uttan endaligt prógv.
Ritgerðin skal prógva evnini hjá studentinum kritiskt at nýta vísindaligt ástøði og háttalag í sjálvstøðugum arbeiði við einum ávísum evni.

Studenturin velur ritgerðarevnið í samráð við vísindastarvsfólk á deildini. Útbúgvingarleiðarin skal góðkenna, og dekanurin skal staðfesta evnið. MA-ritgerðin kann vanliga ikki viðgera sama evni, sum hevur verið brúkt til uppgávuevni ella próvtøkuevni í MA-náminum ella BA-náminum.
Vanliga skal ein av lærarunum í føstum starvi á Føroyamálsdeildini virka sum leiðbeinari, men í stakføri kann deildin góðkenna annað serkønt fólk sum leiðbeinara.

### MA-fyrilestur

Tá ið MA-ritgerðin er góðkend og próvdømd, heldur studenturin 45 minuttir langan fyrilestur við støði í ritgerðarevninum. Lærarin/leiðbeinarin ásetur fyrilestrarevnið, og studenturin fær eina viku at fyrireika seg. Fyrilesturin telur 2 ECTS.
Tveir lærarar á deildini døma fyrilesturin saman við leiðbeinaranum og meta avrikið sum "staðið" ella "ikki staðið" við stuttari munnligari grundgeving.

## Aðrar MA-útbúgvingar

Umframt vanligu MA-útbúgvingina í føroyskum og samansett MA í føroyskum ber til at taka tvær MA-útbúgvingar, ið ikki hava BA í føroyskum sum fortreyt.
Upptøkukrøvini og útboðið av skeiðum eru í hesum útbúgvingum øðrvísi. Útboðið av skeiðum á Føroyamálsdeildini er hvørja hálvu ein blandingur av málsligum og bókmentaligum skeiðum. Studentar, sum velja MA í føroyskum bókmentum ella MA í føroyskum máli, mugu góðtaka, at tað kann koma fyri, at t.d. bara eitt ella tvey skeið í einari hálvu hóska til teirra útbúgving, og at útbúgvingin tí má takast sum stakgreinalestur.

### MA í føroyskum bókmentum

MA-nám í føroyskum bókmentum (120 ECTS) er samansett av bókmentaligum lestrarevnum og MA-ritgerð. Lestrarevnini telja 80 ECTS, og ritgerðin saman við fyrilestri telur 40 ECTS. Lestrarevnini eru bókmentalig, samskiftisfrøðilig og ástøðilig.
Upptøkukrøv
Gott BA-prógv í almennari bókmentafrøði. Haraftrat krevst, at lokin verða 10 ECTS í bókmentum á BA-námi í føroyskum.
Gott BA-prógv í øðrum málum og bókmentum. Hóskandi treytir verða ásettar í hvørjum einstøkum føri.

### MA í føroyskum máli

MA-nám í føroyskum máli (120 ECTS) er samansett av málsligum lestrarevnum og MA-ritgerð. Lestrarevnini telja 80 ECTS, og ritgerðin saman við fyrilestri telur 40 ECTS. Lestrarevnini eru málslig og ástøðilig.
Upptøkukrøv
Gott BA-prógv í almennum málvísindum. Haraftrat krevst, at lokin verða 10 ECTS í máli á BA-námi í føroyskum.
Gott BA-prógv í øðrum málum. Hóskandi treytir verða ásettar í hvørjum einstøkum føri.

## Samansett MA

Samansett MA tekur til samans 5 ár (300 ECTS), umframt námsfrøði. Hetta er miðnámslæraraútbúgving, samansett av høvuðsgrein og hjánámi:

**Høvuðsgrein**

1. BA-prógv, 3 ársverk (180 ECTS)
2. Høvuðsritgerð, ½ ársverk (30 ECTS)

**Hjánám**

3. 1½ ársverk (60 ECTS á BA-stigi og 30 ECTS á MA-stigi) í øðrum faki.

**Námsfrøði**

4. Námsfrøðiligt skeið, sum setanarmyndugleikin (Mentamálaráðið ella skúlin, ið starvssetur) skipar fyri.

Í samansettum MA kann føroyskt antin vera høvuðsgrein ella hjánám.
Útbúgvingin gevur førleika til at undirvísa í tveimum lærugreinum í miðnámsskúlunum.

## Høvuðsgrein

Høvuðsgrein er annað fakið í samansettum MA. Høvuðsgrein í føroyskum er samansett av BA-prógvi og høvuðsritgerð.

**Høvuðsritgerðin** telur 30 ECTS og er uml. 60 síður. Høvuðsritgerðin kann vanliga ikki viðgera sama evni, sum hevur verið brúkt sum uppgávuevni ella próvtøkuevni í BA-náminum.
Studenturin velur ritgerðarevnið í samráð við vísindastarvsfólk á deildini. Útbúgvingarleiðarin skal góðkenna, og dekanurin skal staðfesta evnið.
Vanliga skal ein av lærarunum í føstum starvi á Føroyamálsdeildini virka sum leiðbeinari, men í stakføri kann deildin góðkenna annað serkønt fólk sum leiðbeinara.

## Hjánám

Lokið hjánám (hjágrein) í føroyskum kann vera partur av miðnámslæraraprógvi. Hjánámið er sett saman av 60 ECTS úr fyrra parti av BA-náminum og 30 ECTS av lestrarevnum á MA-stigi, um høvuðsgreinin er hugvísindalig. Um høvuðsgreinin ikki er hugvísindalig, má studenturin harumframt taka Vísindaástøði (10 ECTS).

## Upptøkukrøv

Studentur, sum søkir inn á hjánámið í føroyskum, skal hava staðið/ella vera innskrivaður til eina høvuðsgrein.

## Lýsing av útbúgving

**Hjágrein í føroyskum**

*Subsidiary Subject in Faroese Language and Literature*

| | |
|---|---|
| SLAG AV ÚTBÚGVING OG ÁRAMÁL | Partur av samansettum masternámi. 1 ár (60 ECTS) á bachelorstigi og ½ ár (30 ECTS) á masterstigi |
| ÚTBÚGVINGARSTOVNUR/-AR | Fróðskaparsetur Føroya |
| STOVNUR, IÐ GÓÐKENNIR ÚTBÚGVINGAR | Mentamálaráðið |
| TÍÐARBIL, VÍST VERÐUR TIL | 2016-2021 |

| | |
|---|---|
| STIG | BA, “1st Cycle” sambært EQF – LLL og QF – EHEA stig 6 og 7 |

| A: Endamál | |
|---|---|
| | Studenturin vinnur sær førleika til at undirvísa í føroyskum máli og bókmentum í miðnámsskúlum aftur at høvuðsgrein síni. |

<table>
<tr><th colspan="2">B: Eyðkenni</th></tr>
<tr><td>1: Grein(ar) / evnisøki</td><td>Námsevnið er føroyskt mál og bókmentir søguliga og ástøðiliga við atliti at høvuðstáttunum máli, bókmentum og samskifti, býtt í 60 ECTS í kravdum evnum á bachelorstigi og 30 ECTS í valdum evnum á masterstigi.<br>Kravdu skeiðini eru treytað av, hvørt høvuðsgreinin er hugvísindalig ella ikki hugvísindalig:
<table>
<tr><th>Hugvísindalig høvuðsgrein:</th><th>Ikki hugvísindalig høvuðsgrein:</th></tr>
<tr><td>Norrønt (10 ECTS)</td><td>Norrønt (10 ECTS)</td></tr>
<tr><td>Bókmentagreining I (5 ECTS)</td><td>Bókmentagreining I (5 ECTS)</td></tr>
<tr><td>Bókmentagreining II (5 ECTS)</td><td>Bókmentagreining II (5 ECTS)</td></tr>
<tr><td>Bókmentasøga I (10 ECTS)</td><td>Bókmentasøga I (10 ECTS)</td></tr>
<tr><td>Bókmentasøga II (10 ECTS)</td><td>Bókmentasøga II (10 ECTS)</td></tr>
<tr><td>Ljóð- og formlæra (10 ECTS)</td><td>Ljóð- og formlæra (10 ECTS)</td></tr>
<tr><td>Málsøga (8 ECTS)</td><td>Málsøga (8 ECTS)</td></tr>
<tr><td>Eitt norðurlandamál (2 ECTS)</td><td>Eitt norðurlandamál (2 ECTS)</td></tr>
<tr><td></td><td>Vísindaástøði (10 ECTS)</td></tr>
</table></td></tr>
<tr><td>2: Almennur / serligur dentur</td><td>Almennur kunnleiki um føroyskt mál og bókmentir frá umleið 1400 til okkara dagar umframt grundleggjandi vitan um háttaløg og ástøði og førleika at nýta mál- og bókmentafrøðilig greiningarhugtøk kritiskt.</td></tr>
<tr><td>3: Kós</td><td>Útbúgvingin er granskingargrundað og miðar móti undirvísing í føroyskum og mentanarvirksemi á høgum málsligum førleikastigi.</td></tr>
<tr><td>4: Serlig eyðkenni</td><td>Mál og bókmentir verða lýst í norðurlendskum høpi; harafturat verður hugt at fyritreytum teirra í evropeiskari søgu, heimspeki og mentan. Undirvíst verður í norðurlandamálum á norðurlendskum.</td></tr>
</table>

| C: starvsmøguleikar og framhaldsútbúgving | |
|---|---|
| **1: starvsmøguleikar** | Hjágrein gevur undirvísingarførleika í miðnámsskúlum, sum hava føroyskt sum lærugrein. Harumframt gevur hon førleika at virka á almennum stovnum, miðlum og vinnuvirkjum. |
| **2: framhaldsútbúgving** | Hjágrein er partur av samansettum masterprógvi, sum gevur atgongd til ph.d.-útbúgving. |

| D: Útbúgvingarháttur | |
|---|---|
| **1: Arbeiðslag í sambandi við læru- og undirvísing** | Undirvísingarhættirnir eru floksundirvísing við lærara- og studentaframløgum, skrivligar uppgávur, bólkarbeiði, venjingar, feltarbeiði o.a. |
| **2: Próvtøkuhættir** | Próvtøkurnar eru munnligar og skrivligar umframt heimauppgávur við fríum og bundnum evni, og samanseting av skrivligari ella munnligari próvtøku og heimauppgávu. |

| E: Útbúgvingarførleikar |
| --- |
| **1 Almennir førleikar**<br>• Akademiskt arbeiðslag: hugsa og arbeiða skipað og kritiskt við einum avmarkaðum evni. Nýta frøðihugtøk, orða granskingarspurningar, savna og greina tilfar, seta fram niðurstøður og úrslit.<br>• Málsligir førleikar: skriva og tosa í hóskandi samsvari við samskiftisstøðuna t.d. óformliga, formliga, vísindaliga.<br>• Sjálvstøðugt arbeiðslag: arbeiða sjálvstøðugt við atliti at evnis- og tíðaravmarking. |
| **2 Fakligir førleikar**<br>• Kunna greiða frá søguliga høpinum í føroyskum skaldskapi og bókmentum<br>• Duga at lýsa og greina tekst í bókmentum, skaldskapi og fjølmiðlum<br>• Hava innlit í høvuðstekstsløg í munnligum og skrivligum skaldskapi<br>• Hava innlit í hugmynda- og listfrøðilig tíðarskeið<br>• Skilja og nýta ástøði og háttaløg í mál- og bókmentafrøði<br>• Vera før/ur fyri at nýta hóskandi hugtøk, yrkisheiti og fakligan málburð hjá frøðigreinini føroyskum<br>• Hava grundleggjandi vitan um føroyskt mál samtíðarliga og søguliga<br>• Hava kunnleika um hesi málfrøðiligu øki: málsøgu, bendingarlæru, norrønt, føroyska ljóðskipan, formlæru og setningafrøði |

| F: Fullfíggjaður listi við læruúrtøkuni frá útbúgvingini: |
| --- |
| Eftir lokna útbúgving skal studentur vera førur fyri at<br>• Greiða frá høvuðstáttunum í føroyskari mál- og bókmentasøgu frá umleið 1400 og bera saman við eldri norðurlendsk málstig og høvuðstættir í norðurlendskari mál- og bókmentasøgu<br>• Skyna á høvuðsmununum millum norðurlendsk mál<br>• Skriva tekstir og leggja fram munnliga um bókmentir og mál grundað á nýggjastu vitan á økinum<br>• Leggja fram munnliga á máli, ið hóskar í samskiftisstøðuni<br>• Finna fram hóskandi tilfar til undirvísing í ávísum evnum<br>• Á kritiskum grundarlagi duga at taka upp og taka lut í orðaskifti um dygd í máli, bókmentum og øðrum tekstum<br>• Greiða frá ymiskum bókmentaligum og málsligum stílløgum<br>• Greiða frá granskingarsøguni hjá føroyskum máli og bókmentum |

## Hjánám til avriksflutning

Til ber eftir avtalu at fáa øðrvísi samanseting av hjánámi, um námið er partur av útbúgving á øðrum universiteti, sum krevur hetta.

# Felags reglur fyri MA, BA og Hjánám

## Allýsing av lestrarevnum

Undirvísingin á bæði seinna partinum av BA og í MA-náminum er skipað í lestrarevni, men krøvini um at nema djypri innlit og víðari fatan hækka frá BA til MA. Kravið um at ogna sær innlit í djypri tilfarsnøgd á MA sæst m.a. í størri krøvum til lestrarlista.

Studentarnir velja millum tey lestrarevni, sum eru í boði.

Lestrarevnini eru ymisk til støddar, oftast millum 5 og 20 ECTS. Eitt lestrarevni, sum er 20 ECTS, svarar til undirvísing í umleið 90 tímar; eitt lestrarevni, sum er 10 ECTS, svarar til undirvísing í umleið 45 tímar o.s.fr. Vanliga eru lestrarevnini 10 ECTS.

Lestrarevnini eru bókmentalig, málslig ella samansett. Tilfarið, ið lesast skal í einum lestrarevni, er vanliga av trinnanda slag:

- ament ástøði og háttaløg
- serbókmentir
- grundtekstir

Í tí fyrsta bólkinum eru fyrst og fremst samanhangandi verk um ástøði og háttalag, men greinir og greinasøvn koma eisini upp á tal. Annar bólkurin er eitt úrval av serbókmentum við greiningum, viðgerðum o.tíl., eitt nú greinir og partar av størri verkum. Nøgd og slag kann skifta eftir lestrarevni, serliga tá ið tað ræður um tann seinasta bólkin, grundtekstir. Grundtekstir í bókmentaligum lestrarevnum eru yrkingar, kvæði, skaldsøgur, ástøðilig ella søgulig verk o.a., alt eftir hvat lestrarevni tað snýr seg um; grundtekstir í málsligum lestrarevnum eru skrivlig tekstdømi, bandupptøkur o.a.; í samansettum evnum eru grundtekstir ymisk tekstsløg, myndir o.a., alt eftir evni.

## Dømi um lestrarevni

- *Bókmentalig lestrarevni*: bókmentasøgulig tíðarskeið, ritverk, tekstslag, tema og motiv, bókmentastovnurin, samfelagið í bókmentunum, ástøði, kvæðaskaldskapur o.o.
- *Málslig lestrarevni*: málsøga, málllæra, málføri og talumál, navnafrøði, orðabókarfrøði o.o.
- *Samansett lestrarevni*: samskifti, ástøði, stílfrøði, tungulist o.o.

## Góðskrivingar av lestri uttanlands og á øðrum deildum á Fróðskaparsetrinum

Treytin fyri at studentur tekur part/ar av náminum uttanlands og/ella á øðrum deildum Setursins er, at studenturin leggur lesturin til rættis og ger avtalu um hann við ta universitetsdeild, hann ætlar at vitja. *Ætlanin skal leggjast fyri Føroyamálsdeildina frammanundan til fyribils góðkenningar fyri at tryggja, at tað ber til at góðskriva lesturin.*
Studentar, ið koma við prógvi frá øðrum lærustovni ella øðrum deildum á Setrinum og sum ynskja at fáa lærugreinir góðskrivaðar, skulu søkja fyri 1. oktober/1. mars.
BA-studentar kunnu taka til samans 40 ECTS uttanlands og/ella á øðrum deildum Setursins øll trý árini, men ritgerðin skal gerast á Føroyamálsdeildini. Studentar á fyrra parti av BA, sum fara á summarskeið og ikki hava brúk fyri ECTS á fyrra parti, kunnu deponera tey og fáa tey góðskrivað á seinna partinum. Tað ber tó ikki til at goyma ECTS til MA-lesturin. Nordkurs-skeið kunnu bara góðskrivast á BA-partinum – ikki á MA-partinum.
MA-studentar, sum eisini hava lokið bachelornámið á Setrinum, kunnu taka 60 ECTS uttanlands og/ella á øðrum deildum Fróðskaparsetursins. Um BA-prógvið er tikið uttan fyri Setrið, kunnu MA-studentar í mesta lagi fáa 30 ECTS góðskrivað.
Í hjánámi kunnu í mesta lagi 10 ECTS verða góðskrivað á BA-stigi – og eingi á MA-stigi.
Tá prógv/skeið eru eldri enn 10 ár, og tá studentar ynskja at taka lesturin uppaftur aftan á langan steðg, skal serlig viðgerð til í sambandi við góðskrivingar.

### Lokin skeið eftir eldri námsskipanum
Skeið, ið eru lokin á deildini eftir eldri námsskipanum, kunnu góðskrivast/flytast til galdandi lestur eftir umbøn. Avtala skal gerast um tað við útbúgvingarleiðaran.

### ECTS (European Credit Transfer System)
ECTS er ein roknieind fyri støddina og arbeiðsbyrðuna á náminum. Eitt námsár (fulltíðarnám) svarar til 60 ECTS, og lærugreinir, lestrarevni og ritgerðir fáa tillutað so mong ECTS, sum námsbyrðan svarar til í fulltíðarnámi. Eitt ECTS svarar til 25-30 arbeiðstímar.

### Innskriving
Tá studentur er upptikin á deildina, verður hann biðin um at útfylla innskrivingarblað til lestur og próvtøku. Innskrivingarblaðið er bara galdandi fyri eitt lestrarár. Tað merkir, at studenturin skal endurnýggja innskrivingina á hvørjum ári (fyri 20. august). Til stakskeið er studenturin innskrivaður ta hálvu, skeiðið verður lisið.
Innskriving til próvtøku er sjálvvirkin. Tó skulu tey, ið hava víðkað lestrarevni, og tey, sum taka sjálvlestrarevni, skriva seg inn til próvtøku innan freistirnar 1. oktober/1. mars.
Tað ber ikki til at taka seg aftur frá próvtøku, og studenturin má bíða til næstu regluligu próvtøkur eru, um hann ikki fer til próvtøku, tá regluliga próvtøkan verður hildin – sí tó ásetingar um sjúku s. 44.

## Próvtøkur

### Almenn próvtøkukrøv
Próvtøka er í hvørji lærugrein sær. “Staðið” ella “2” eftir 7-talsstiganum/”6” eftir 13-talsstiganum krevst fyri at standa hana.
Summar próvtøkur eru skipaðar sum “uttanhýsispróvtøkur”, og tá verður avrikið dømt saman við próvdómara frá øðrum lærustovni, og próvtal verður givið. Aðrar próvtøkur eru skipaðar sum “innanhýsispróvtøkur”, og tá dømir lærarin í lærugreinini saman við øðrum lærara/lærarum á megindeildini avrikið sum “staðið” ella “ikki staðið”.
Í summum førum ber til at sleppa undan próvtøku, um studenturin møtir til 80% av tímunum í lærugreinini og er virkin í tímunum - sí lýsing av lærugreinunum.
Við próvtøku skal studenturin prógva, at hann hevur ognað sær nøktandi fakligt innlit í tær einstøku lærugreinirnar. Eisini skal hann vísa, at hann dugir føroyskt mál í talu og skrift. Próvtøkumálið er føroyskt. Tó kann próvtøkumálið vera annað norðurlendskt mál, um lærarin ella próvdómarin ikki skilur føroyskt. Fyri skiftisstudentar eru aðrar reglur galdandi.
Tá ið skrivligar uppgávur verða dømdar, vigar fakligt innihald mest. Men í dømingini verður eisini hugt eftir stavseting, og um studenturin dugir at málbera seg rætt og greitt. Sí s. 43 *Reglur um krøv til málsligan rættleika.*

### Lestrarlistar
Studenturin skal í seinasta lagi ein mánað fyri próvtøkudag (til bundna heimauppgávu: ein mánað áðrenn evnið verður útflýggjað) lata læraranum lestrarlista til góðkenningar. Á lestrarlistanum skulu standa uppgivin verk, tekstir og blaðsíðutal. Leiðbeining viðvíkjandi lestrarlista fæst vanliga í sambandi við undirvísingina. Um studenturin skrivar fría heimauppgávu, verður lestrarlisti ikki latin inn. Á støðisnáminum er tilskilað við tær einstøku lærugreinirnar, um lestrarlisti skal latast inn.
Nærri upplýsingar um lestrarlistar til BA- og MA-lestrarevni, sí ávikavist s. 28 og 33.

### Verk, tekstir og blaðsíður
Í lestrarlistunum eru krøv sett viðvíkjandi verkum, tekstum og blaðsíðum.

Eitt **verk** er ein heild, t.d. eitt yrkingasavn, stuttsøgusavn, ritroyndar-/essay-savn, skaldsøga, leikrit, sjónvarps- og útvarpssending. Tað kann eisini vera eitt tekstasavn, sum studenturin sjálvur setur saman, og sum í minsta lagi er 100 síður til støddar.
Í kvæðaskaldskapi er ein bólkur av kappakvæðum, ið evnisliga hoyrir saman, eitt verk, t.d. Regin smiður, Brynhildar táttur og Høgna táttur (CCF 1). Eitt verk kann eisini setast saman av fleiri kvæðum, eini 300 ørindi.
**Stuttir tekstir** eru stakar yrkingar, stuttsøgur, ritroyndir/essay, greinir, hugleiðingar, kvæðir og vísur. **Tekstir** eru eisini brøv, samrøður, lýsingar, myndir o.tíl.
Eitt **vísindaligt verk** er ein vísindalig ritgerð, 80-100 síður ella meira. Studenturin kann sjálvur seta eitt vísindaligt verk saman av greinum og stuttum ritgerðum. Tað skal í minsta lagi vera 100 síður til støddar.
Roknað verður við **miðalblaðsíðum**, sum eru um 2.400 eindir hvør.
*Í próvtøkupensum svarar ein minuttur av ljóðupptøku til eina normalsíðu.*

## Heimauppgávur

Til summar próvtøkur skal studenturin skriva eina heimauppgávu, sum hevur samband við undirvísingina í staðin fyri at fara til skrivliga ella munnliga próvtøku. Tvey sløg av heimauppgávum eru: uppgáva við uppgivnum evni (bundin heimauppgáva) ella uppgáva við sjálvvaldum evni (frí heimauppgáva).
*Frí heimauppgáva:* Tá er próvtøkan heimauppgáva um eitt sjálvvalt evni. Treytin fyri at studenturin sleppur at skriva fría heimauppgávu er, at hann virkin hevur fylgt undirvísingini; eitt nú skal hann í minsta lagi hava verið í 80% av tímunum. Lærarin skal góðkenna evnið til ta fríu heimauppgávuna, og uppgávan skal vera innlatin ásettan dag.
*Bundin heimauppgáva*: Til uppgávu um eitt uppgivið evni (2 vikur) orðar lærarin spurningin.
*Vegleiðandi longdin á uppgávum er:*
Heimauppgáva, sum telur 5 ECTS, skal vera uml. 7-10 síður á seinna parti av BA og í MA-námi.
Heimauppgáva, sum telur 10 ECTS, skal vera uml. 10-12 síður á seinna parti av BA og 15-17 síður í MA-námi.
Heimauppgáva, sum telur 20 ECTS, skal vera uml. 25 síður á seinna parti av BA og uml. 30 síður í MA-námi.
Hesar tilráðingar um longd eru vegleiðandi og sum heild kann sigast, at bókmentauppgávur eru longri enn uppgávur við málsligum evni.Roknað verður við miðalsíðum við uml. 2.400 eindum (bókstøvum, teknum og millumrúmum íroknaðum), tað er t.d. Times New Roman 12 pkt., breddin vinstru- og høgrumegin 3 cm, í erva og í neðra 2,5 cm, hálvtannað regluglopp. Við í síðutalið telja uppgávutekstur og notur, ikki perma, innihaldsyvirlit, bókmentalisti og fylgiskjøl.
Aftast í heimauppgávunum skal vera bókmentalisti.

## Bólka- og einstaklingsuppgávur

Tað ber til at skriva heimauppgávur einsamallur/einsamøll ella í bólki. Í mesta lagi tríggir studentar kunnu skriva uppgávu saman. Til støddar skulu uppgávur skrivaðar í bólki vera so mangar ferðir fleiri blaðsíður enn einstaklingsuppgávurnar, sum studentar eru í bólkinum. Studentarnir skulu skila til, hvat hvør hevur skrivað og hevur ábyrgdina av í uppgávuni og lata uppgávuna døma eftir tí, soleiðis at hvør studentur fær sítt próvtal.

## Vísindaligt rættlæti

Studenturin má fylgja reglunum um vísindaligt rættlæti. Tað er óreiðiligt at lata vera við at uppgeva/dylja á slíkan hátt, at villleiðing stendst av viðvíkjandi avriki hjá viðkomandi studenti. Til dømis metist tað sum dyljing ikki at geva upp allar heimildir til ritgerð. Avskrift og eftirgerð av tekstum hjá øðrum er falsan, um ikki greitt verður tilskilað, hvat er sitat, hvat er endursøgn av teksti hjá øðrum, og hvaðani hugmyndir, sum ikki eru almennar og ikki eru studentsins, eru fingnar.
Verður stuldur og svik avdúkað í skrivligum uppgávum, bæði próvtøkuuppgávum og øðrum innlatingum, verður hetta revsað, og í ringasta føri kann studentur verða burturvístur av Fróðskaparsetrinum.

Øll endurgáva, sum verður gjørd uttan at gera vart við, at hetta eru tankar hjá einum øðrum, er svik og verður revsað. Dømi, sum heilt greitt eru svik, er at lata uppgávu inn, sum studenturin ikki sjálvur hevur skrivað ella at lata somu uppgávu inn til fleiri prógvtøkur.
Harumframt má studenturin leggja sær í geyma ta meginreglu, at ikki ber til at nýta somu bókmentir/heimildir til fleiri uppgávur.

# Próvtøkuhættir

## Próvtøkuhættir á fyrra parti á BA

Í hvørji lærugrein sær verður ásett, hvørjir próvtøkuformar galda. Sí s. 27 ella tær einstøku skeiðslýsingarnar.

## Próvtøkuhættir í lestrarevnum (BA og MA)

*Galdandi fyri lestrarevni, ið telja 20 ECTS:*
1. Munnlig próvtøka í 45 minuttir (við 45 minuttum í fyrireikingartíð)
2. Skrivlig próvtøka í 8 tímar

*Galdandi fyri lestrarevni, ið telja 10 ECTS:*
1. Munnlig próvtøka í 30 minuttir (við 30 minuttum í fyrireikingartíð)
2. Skrivlig próvtøka í 6 tímar
3. Synopsa, sum skal latast inn ávíst dagatal fyri munnliga framløgu
4. Munnlig hálvtíma framløga við 1-3 dagar fyrireiking um uppgivið evni.

*Galdandi fyri lestrarevni, ið telja 5 ECTS:*
1. Munnlig próvtøka í 30 minuttir (við 30 minuttum í fyrireikingartíð)
2. Skrivlig próvtøka í 4 tímar

Heimauppgávur:
1. Heimauppgáva (tvær vikur) um eitt uppgivið evni
2. Heimauppgáva (ein vika). Fyrireiking til munnliga framløgu um uppgivið evni
3. Heimauppgáva um sjálvvalt evni, ið hevur samband við undirvísingina. Lærarin skal góðkenna evnið. Treytin fyri at skriva fría heimauppgávu er, at studenturin hevur verið virkin í undirvísingini
   Um støðd: sí Heimauppgávur s. 41.

Í hvørjum lestrarevni sær verður ásett, hvørjir próvtøkuformar galda. Lærari kann eisini søkja um at royna nýggjar próvtøkuhættir, sum ikki eru lýstir í námsskipanini. Í slíkum førum skal lærarin, áðrenn skeiðið verður lýst, leggja eina skrivliga umsókn við grundgevingum fyri útbúgvingarleiðaran.Avgerðin hjá útbúgvingarleiðaranum skal síðani staðfestast í Lestrarráðnum. Eftir skeiðslok og próvtøku skal lærarin senda Lestrarráðnum eina eftirmeting.

# Reglur um krøv til málsligan rættleika í skrivligum heimauppgávum og ritgerðum

## Førleiki í staving og málburði

Í metingini av skrivligum uppgávum, BA-ritgerð, MA-ritgerð og høvuðsritgerð, ph.d-ritgerð og øllum øðrum ritgerðum á Føroyamálsdeildini er førleikin í staving og málburði partur av tí, sum verður mett, hóast høvuðsdenturin verður lagdur á tað fakliga innihaldið.
Tær skrivligu heimauppgávur, sum latnar verða inn gjøgnum námið, eiga í vaksandi mun at vísa neyvleika og vísindaligt nákvæmi, ástøðiliga hugsan og yvirlit og at vera orðaðar á greiðum og røttum máli.

Í teimum førum at stavivillur og ónøktandi málburður draga meira enn eitt próvtal niður, verður uppgávan vrakað og send próvtakaranum aftur við boðum um endurinnlating við nøktandi stavseting og málburði í einum eftirfylgjandi próvtøkutíðarskeiði. Í hesum føri fellur studenturin ikki.
Verður uppgávan aftur vrakað, verður hon skrásett sum “ikki innlatin”, og studenturin hevur harvið brúkt ein av møguleikunum at fara til próvtøku. Í hesum seinna førinum má nýggj uppgáva skrivast.

# Próvreglur

## Próvtøka

Øll skeið enda við próvtøku. Studentur, sum ikki møtir, er fallin. Tey, sum ætla sær til próvtøku í lærugreinunum í føroyskum máli og bókmentum, skulu:

- vera innskrivað á Fróðskaparsetrinum til nám á Føroyamálsdeildini
- hava møtt regluliga til undirvísing
- um próvtøkan fevnir um víðkað pensum og sjálvlestur, skriva seg inn til próvtøku fyri 1. oktober/1. mars
- lata inn góðkendan lestrarlista til ásetta tíð, t.e. 1 mánað fyri próvtøkudag (til bundna heimauppgávu 1 mánað fyri dagin, tá ið evnið verður útflýggjað), um so er, at hann er kravdur – sí lestrarlistar s. 28 og 33
- til munnliga og skrivliga próvtøku: møta rættstundis próvtøkudagin, t.e. **í seinasta lagi 15 minuttir** fyri próvtøkubyrjan
- til bundna heimauppgávu: kvitta fyri móttøku av uppgávuevni og lata svarið inn aftur ásetta tíð
- til fría heimauppgávu: lata inn uppgávu í seinasta lagi ásettan dag og tíð.

Bundnar og fríar heimauppgávur skulu latast inn talgilt. Tá innlatið er, uttan at freistin er farin, ber ikki til at lata inn av nýggjum (við broytingum/rættingum).
BA- og MA-ritgerðir skulu latast inn í trimum pappírsútgávum. MA-ritgerðin skal harumframt latast inn talgilt.
Tá studentar skulu gera BA-, MA- og høvuðsritgerð, skulu teir avtala eitt evni við ein leiðbeinara, og útbúgvingarleiðarin skal góðkenna, og dekanurin skal staðfesta evnið.

## Endurpróvtøka

Studentur kann í mesta lagi fara tríggjar ferðir til somu próvtøku. Útbúgvingarleiðarin kann tó eftir skrivligari umsókn loyva studentinum at fara til próvtøku í sama faki fjórðu ferð, um **serligar umstøður** tala fyri tí. Umsókn um undantaksloyvi skal vera latin deildini í seinasta lagi 2 vikur, eftir at studenturin hevur fingið boðini um, at hann er fallin triðju ferð.
Studenturin kann ikki krevja at sleppa til endurpróvtøku, um hann ikki fer til próvtøku, tá regluliga próvtøkan verður hildin, tó er sjúka undantak.
Tá studentur er fallin til eina próvtøku, skal hann/hon gera avtalu við læraran um endurpróvtøku.

## Sjúka

Um sjúka forðar studenti í at fara til próvtøku skal hann **í seinasta lagi, tá próvtøkan byrjar,** boða deildini frá, at hann er sjúkur. **Harumframt** skal hann lata deildini **sjúkuváttan**:

a. við munnliga og skrivliga próvtøku: í seinasta lagi 8 dagar seinni
b. við bundna heimauppgávu: í seinasta lagi 8 dagar seinni
c. við fría heimauppgávu: í seinasta lagi innlatingardagin

Sjúkrapróvtøkur vera vanliga hildnar í viku 11 og 35.

# Próvtøkuhald

**Møting**

Skrivlig próvtøka byrjar vanliga kl. 9.00.

Studentarnir eiga at koma í seinasta lagi 15 minuttir frammanundan, men best er at koma í góðari tíð, serliga um telda skal setast upp.

Støða verður í hvørjum einstøkum føri tikin til, um ein studentur, ið møtir eftir at próvtøkan er byrjað, kann sleppa inn. Er nakar av teimum, ið eru til próvtøku, farin út úr próvtøkuhølinum, aftan á at uppgávurnar eru útflýggjaðar, er ikki møguligt at koma inn, uttan so at hin útfarni hevur verið undir støðugum eftirliti. Heldur ikki kann tann, ið kemur seinni enn 1 tíma eftir byrjan, sleppur inn. Tann, ið kemur ov seint, fær ikki lagt afturat tíðini fyri tað, sum mist er.

**Hjálparamboð**

Í skeiðslýsingunum fyri hvørt skeið sær verður vanliga sagt frá, hvørji hjálparamboð loyvt er at hava við sær til próvtøkuna, og kunngerð um tað skal eisini vera sligin upp uttan fyri próvtøkuhølini.

Studentarnir mugu sjálvir kunna seg um hesi viðurskifti og hava við sær loyvdu amboðini. Loyvt er ikki við próvtøkuna at læna frá øðrum enn próvtøkueftirlitinum.

Studentarnir hava skyldu til at lata frá sær til próvtøkueftirlitið øll amboð o.tíl., ið ikki eru loyvd og sum tey hava við sær inn í próvtøkuhølini, íroknað fartelefonir. Annars kunnu teir verða burturvístir.

**Sjúka við próvtøkuhaldið**

Um ein gerst sjúkur við próvtøkuna, kann verða boðað frá til eftirlitið, ið kann fylgja viðkomandi útum eitt stutt bil.

Verður hin sjúki noyddur at gevast við próvtøkuni, skal uppgávan við avrikum latast inn og kann fáa átekning eftirlitsins um, at viðkomandi er givin fyri sjúku. Vil hin sjúki sleppa til sjúkraprovtøku, skal læknaváttan verða latin deildini í seinasta lagi 8 dagar eftir próvtøkudagin.

**Um at fara frá próvtøku**

Fer ein úr próvtøkuhølinum av eini av hesum orsøkum:

a) studenturin vil ikki svara uppgávuni

b) studenturin er liðugur at svara uppgávuni, áðrenn tíðin er farin

c) aðrar próvtøkur fara fram samstundis í sama høli, ið vara longri enn eins egna

má hann fara úr hølinum uttan at órógva.

Samleikateigarnir á svartilfarinum skulu vera fyltir út, áðrenn ein fer úr hølinum, og um studenturin hevur skrivað á teldu, skal hann undirskriva seinasta arkið.

Studenturin kann bara sleppa úr hølinum tann fyrsta tíman, um allir studentarnir eru møttir.

Eingin studentur má fara frá borðinum uttan at boða eftirlitinum frá og lata frá sær uppgávusvørini - ella í minsta lagi umslagið við teigunum útfyltum.

**Próvtøkutíðin lokin**

Tá svartíðin er farin, savnar próvtøkueftirlitið uppgávusvørini, og studentarnir eiga at steðga á, til alt tilfarið er innlatið. Er nakar farin út úr hølinum við uppgávusvørunum, verður tilfarið ikki próvdømt, men hetta telur kortini sum ein próvtøka.

**Próvtøkuúrslit**

Úrslitið av próvtøkuni verður vanliga kunngjørt beint eftir lidna próvdøming. Aðalreglan er, at próvtøkur skulu vera próvdømdar innan ein mánað. Undantiknar hesi reglu eru Høvuðs- og MA-ritgerðir. Tær skulu vera próvdømdar innan tveir mánaðir.

**Viðvíkjandi kærum**

Víst verður til galdandi kunngerð (sí heimasíðu Setursins).

# Reglur um teldunýtslu til próvtøku

Umframt vanligu próvreglurnar eru hesar reglur galdandi fyri  teldunýtslu til próvtøku:

1) Studentarnir skulu sjálvir hava teldu við, meðan Setrið syrgir fyri útprentingini.
**2)** Um loyvt er at brúka orðabøkur til próvtøkuna, fæst atgongd til orðabøkur Sprotans á *uni_exam*. Studentarnir fáa loyniorð til *uni_exam* frá próvtøkueftirlitinum, beint áðrenn próvtøkan byrjar. **Burtursæð frá *uni_exam*, sum bara er loyvt til nakrar próvtøkur, er ikki loyvt at brúka Internetið yvirhøvur.**
3) Umframt serligu atgongdina til orðabøkur Sprotans kann studenturin bara vera á skjalinum, sum er lagt á útflýggjaða geyman, og um notur eru loyvdar, er eisini loyvt at fara inn á tær, men tær eiga at vera goymdar fyri seg í serligari mappu, soleiðis at próvtøkueftirlitið skal kunna hava eftirlit. *Um eingi hjálparamboð eru loyvd, skal studenturin bara vera á skjalinum á geymanum (sum hevur serligan lit).*
4) Studenturin fær útflýggjaðan geyma við skjali við arkhøvdi, sum bert kann verða nýtt í Word (ella Word-sambæriligum forriti) frá deildini, áðrenn próvtøkan byrjar, og mælt verður til at nýta skriftina Times New Roman, stødd 12 og hálvtannað regluglopp.
5) Tá studenturin er liðugur og ætlar at lata inn, skal geymin handast eftirlitsfólkinum, sum syrgir fyri, at tilfarið verður prentað út. Studenturin verður sitandi á sínum plássi til eftirlitsfólkið kemur aftur við útskrivaða uppgávusvarinum. Loyvt er at prenta út eitt royndarprent. Til ber vanliga bara at prenta út seinasta tíman av próvtøkutíðini. Tá próvtøkutíðin er farin, skal alt vera útprentað og lagt í próvtøkuumslagið.
6) Tað er studenturin sjálvur, sum velur tey ørk, ið skulu latast inn til døming. Øll útskrivað ørk skulu byrja við navninum á studentinum og hava dagfesting og síðunummar á. Undirskrift skal vera á seinasta arki. Geymin kann ikki nýtast sum kladda ella sum skjalprógv fyri, hvat møguliga skuldi verið latið inn.
7) Studenturin hevur sjálvur ábyrgd av regluliga at goyma tekstin, meðan próvtøkan fer fram. At teksturin ikki er goymdur, gevur ikki grundarlag fyri at fara til endurprótvøku.
8) Um streymslit er, meðan próvtøkan fer fram, ella aðrir trupulleikar taka seg upp, sum ikki beinleiðis kunnu vera bøttir í sambandi við at nýta telduútgerð, heldur próvtøkan fram, uttan at teldan verður nýtt. **Tí er tað eisini sera týdningarmikið, at teksturin javnan verður goymdur á geymanum.**
9) Studenturin hevur sjálvur ábyrgd av, at telduútgerðin riggar. Eingin teldukønur verður til staðar at hjálpa. Um so er, at trupulleikar stinga seg upp í telduútgerðini hjá tí einstaka, verður ikki longt um próvtøkutíðina, ei heldur verður møguleiki fyri endurprótvøku. Studenturin skrivar tí víðari við hond og kann annars til eina og hvørja tíð fara at skriva við hond heldur enn teldu.
10) Studenturin hevur sjálvur ábyrgd av, at ognin er tryggjað móti stuldri ella herverki, meðan ognin stendur í próvtøkuhølinum.

- Studenturin skal møta í góðari tíð og skal, áðrenn próvtøkan byrjar, tryggja sær, at teldan virkar, sum hon skal. Hann skal eisini tryggja sær, at geymin virkar saman við telduni.
- Staðfestir studentur fyri próvtøkubyrjan, at teldan ikki virkar, ella tað er sannlíkt, at teldan ikki fer at virka gjøgnum alla próvtøkuna, t.d. tí at trupulleikar eru við ritbúnaði ella tí at streymkápilin er gloymdur, má studenturin skriva við hond.

## Kærur

Víst verður til galdandi kunngerð.

## Hesar broytingar/tillagingar eru gjørdar í 2. útgávu av námsskipanini:

- Í hjánámi kunnu í mesta lagi 10 ECTS verða góðskrivað á BA-stigi og eingi á MA-stigi s. 39.
- Nordkurs-skeið kunnu bara góðskrivast á BA-partinum s. 39.
- Tá prógv eru eldri enn 10 ár, og tá studentar ynskja at taka lesturin uppaftur aftan á langan steðg, skal serlig viðgerð til í sambandi við góðskrivingar s. 39.
- Tíðin til bundnar heimauppgávur á seinna parti á BA og MA er stytt úr trimum í tvær vikur, og krøvini til síðutøl eru lækkað samstundis s. 41.
- Í próvtøkupensum svarar ein minuttur av ljóðupptøku til eina normalsíðu s. 41.
- Próvtøkuformarnir fyri lestrarevni, ið telja 10 ECTS, eru dagførdir s. 43.